# Roknskapargreining av fiskiflotanum 2008 til 2012

© **JANUAR,** Løggilt grannskoðanarvirki
Tað er ikki loyvt at avrita tilfarið uttan loyvi frá JANUAR

# Innihaldsyvirlit

Inngangur og niðurstøða ........ 2
Allur flotin ........ 5
Pelagisk vinna ........ 17
Rækjuvinna ........ 23
Verksmiðjutrolarar ........ 27
Partrolarar ........ 31
Lemmatrolarar ........ 37
Línuskip ........ 43
Garnaskip ........ 48
Definitiónir av lyklatølum ........ 52

# Inngangur og niðurstøða

## Inngangur

Roknskapargreiningin umfatar meginpartin av fiskiflotanum fyri árini 2008 til 2012. Vit hava – við fáum undantøkum - tikið øll fiskiskip við í greiningina, ið eru omanfyri 110 tons (línuskip v.m.) ella hava eina maskinorku yvir 400 HK (trolarar), svarandi til flokkingina av fiskiskipum í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Vit hava tikið støði í almennu ársfrásagnunum hjá teimum feløgum, ið eiga skipini, og harumframt hava vit fingið upplýst nettosølu og veiðinøgd v.m.

Útróðrarflotin er ikki við í greiningini, tí har eru bert fáir bátar, ið eru skipaðir í parta- ella smápartafelag við skyldu at lata inn almenna ársfrásøgn.

Roknskapargreiningin er býtt upp í hesar vinnugreinar:

- Pelagisk vinna
- Rækjuvinna
- Verksmiðjutrolarar
- Partrolarar
- Lemmatrolarar
- Línuskip
- Garnaskip

Í greiningini hava vit lagt dent á at vísa gongdina hjá hvørjum einstøkum skipabólki hesi 5 árini. Fyri at fáa eina heildarmynd av fiskivinnuni hava vit somuleiðis valt at leggja tølini fyri allar skipabólkarnar saman, og eru hesar talvur tær fyrstu í frágreiðingini.

Um hugt verður eftir 5 ára skeiðnum 2008 – 2012 hevur hetta sum so mangan áður – tá talan er um fiskivinnu - verið merkt av broytingum av teimum umstøðum, sum okkara fiskivinna hevur at virka undir.

Størsta einstaka broytingin er sjálvandi tann, at vit frá 2010 hava ásett okkara egnu makrelkvotu, sum er fiskað í føroyskum sjógvi. Hetta hevur havt við sær, at vit ikki hava havt sáttmálar við Norra og EU um sínamillum fiskivinnusamstarv hesi árini.

Ein onnur broyting er tann, at frá 2011 eru lemmatrolararnir komnir undir fiskidagaskipanina.

Síðani 2010 hava aðrir skipabólkar enn pelagisk skip luttikið í makrelfiskiskapinum við Føroyar.

## Niðurstøða

Vit hava lagt dent á, at roknskapargreiningin skal geva lesarunum møguleika fyri at gera sínar egnu niðurstøður, tí taltilfarið er rúgvusmikið og kann greinast á ymsar hættir. Vit kunnu staðfesta, at tað eru farnar fram stórar broytingar í tíðini frá 2008 til 2012.

Sum heild hava tey seinastu árini í fiskiflotanum verið sera skiftandi. Árini 2008 og 2009 var talan um undirskot áðrenn óvanligar inntøkur. Síðani 2010 hevur samlaða úrslitið verið positivt. Hetta hevur tó serliga verið orsakað av góðu gongdini hjá pelagiska flotanum, sum hevur havt góð úrslit síðani 2010. Eisini verksmiðju- og rækjuskipini hava havt positiv úrslit síðani 2010. Restin av flotanum (tvs. heimaflotin) hevur havt hall øll árini í tíðarskeiðnum.

Óvanligar inntøkur og útreiðslur ávirka ársúrslitið árini 2008 -2010, síðani 2010 er samlaða úrslitið ikki ávirkað av óvanligum inntøkum og útreiðslum.

Roknskapargreiningin umfatar ikki 2013, men tað eru ábendingar um, at árið 2013 verður nakað á somu leið fyri pelagisku skipini, hetta tí at økt veiðunøgd væntast at kompensera fyri lækkandi miðalprísum.

Fyri rækjuskipini væntast eisini positivt úrslit, hetta tá veiðunøgd og prísir hava hildið sær á nøkulunda sama støði sum í 2012. Fyri verksmiðjuskipini væntast eitt lakari úrslit í 2013 enn í 2012, hetta serliga orsakað av at prísfallinum.

Støðan hjá heimaflotanum er ikki broytt stórvegis í 2013. Fyri lemma- og partrolararnar væntast eitt úrslit á sama støði, men kemur línuflotin væntandi at hava eitt vet betri úrslit í 2013, hetta serliga orsakað av góða fiskiskapinum á Flemish Cap í summar.

Gongdin verður tí væntandi á leið sum í 2012, men verða tað tó fleiri skipabólkar (heimaflotin), ið framvegis verða sera hart kroystir fíggjarliga.

Fyri teir einstøku bólkarnar kunnu vit nevna:

***Pelagisk vinna***

Pelagisku skipini hava síðani 2010 klárað seg væl. Veiðuvirði og úrslit eru munandi økt og hava ligið støðugt høgt hesi árini. Orsøkin til hesa gongd er serliga tann hækkandi kvota av makreli sum Føroyar hava tillutað sær.

Góða gongdin hjá pelagisku skipunum væntast at halda sær í 2013. Kvoturnar av serliga sild og svartkjafti eru hækkaðar í 2013, og væntast hetta at kompensera fyri lægri miðal avreiðingarprísum í 2013.

***Rækjuskip***

Gongdin hjá rækjuskipunum er vend í tíðarskeiðnum 2008 – 2012. Úrslitini fyri 2011 og 2012 mugu metast nøktandi. Henda positiva gongdin hevur havt við sær, at gjaldførið og soliditetur er batnaður í tíðarskeiðnum. Soliditeturin má tó framvegis metast at verða í lægra lagi.

Tað hevur ikki verið møguligt at fáa neyv hagtøl viðvíkjandi miðalprísi og veiðinøgd fyri fyrstu 8 mánaðirnar í 2013 í mun til sama tíðarskeið í 2012. Tó sær út sum, at prísur og veiðunøgd hava hildið sær á nøkulunda sama støði sum í 2012. Væntast kann tí, at hesin parturin av flotanum kemur at hava eitt positivt úrslit í 2013.

Tá talan bert er um 2 rækjuskip í bólkinum, kunnu minni broytingar fáa stórar broytingar á samlaðu gongdina.

***Verksmiðjutrolarar***

Verksmiðjutrolararnir høvdu hall í 2008 og 2009. Síðani 2010 hevur hesin parturin av flotanum havt positiv úrslit. Gjaldføri og soliditetur hevur øll árini verið nøktandi hjá hesum parti av flotanum.

Tað hevur ikki verið møguligt at fáa neyv hagtøl viðvíkjandi miðalprísi og veiðinøgd fyri fyrstu 8 mánaðirnar í 2013 í mun til sama tíðarskeið í 2012. Hesin skipabólkur hevur fingið hægri kvotu í russiskum sjógvi, men samstundis eru veiðurættindi á Flemish Cap, sum verksmiðjutrolararnir hava havt atgongd til, latin øðrum at fiska í 2013. Prísurin á flaki hevur eisini verið fallandi í 2013. Hesi viðurskifti saman við útskifting/umvælingum av skipum í bólkinum koma væntandi at ávirka úrslitið negativt. Tískil má roknast við einum lakari úrsliti fyri henda partin av flotanum í 2013 enn árini 2011 og 2012.

***Partrolarar***

Partrolararnir hava havt nøkur vánalig ár. Hóast hækkandi samlað veiðuvirði hevur ognaravkastið við undantakið av 2011, verið negativt øll árini. Vánaliga gongdin hevur havt við sær, at gjaldførið hjá bólkinum er versnað munandi og er ikki nøktandi við árslok 2012. Soliditeturin hjá hesum bólkinum hækkaði í 2009, men hevur síðani verið fallandi og er ikki nøktandi við árslok 2012.

Fíggjarstøðan hjá partrolaraflotanum er sostatt munandi versnað seinni árini og er ikki nøktandi við árslok 2012.

Um hugt verður eftir útlitunum fyri 2013, er okkara meting at gongdin verður á leið sum í 2012. Upsafiskiskapurin í vár var væl undir miðal, tað eru tó ávisar ábendingar um at fiskiskapurin hevur verið batnandi í seinastuni. Fiskiskapurin eftir gulllaksi hevur roynst betri enn í 2012, bæði orsaka av veiðunøgd og betri prísi. Nøkur pør hava eins og undanfarin ár fiskað makrel í 2013 og hevur hesin fiskiskapur givið eitt ávíst íkast í 2013. Hinvegin ger vánaligi upsafiskiskapurin, sum er høvðusfiskaslagi hjá hesum parti av flotanum og framhaldandi høgi oljuprísurin í 2013, at úrslitið ikki kann væntast at verða øðrvísi enn í 2012.

***Lemmatrolarar***
Úrslitini hjá hesum parti av flotanum hava ikki verið nøktandi í árini 2008 – 2012. Øll árini hava samlað givið hall hjá hesum parti av flotanum. Samanumtikið kann sigast, at fíggjarstøðan hjá hesum skipum ikki eru nøktandi. Gjaldførið hevur verið versnandi og kann ikki metast at verða nøktandi við árlok 2012. Soliditeturin er eisini fallin í tíðarskeiðnum og er heldur ikki nøktandi við árslok 2012.

Vánaligi upsafiskiskapurin í 2013, hevur esini ávirka gongdina hjá hesum parti av flotanum í 2013. Tey flestu av skipunum í hesum bólkinum hava, eins og árini frammanundan,  luttikið í makrelfiskiskapinum og hevur hesin fiskiskapurin givið eitt ávíst íkast til raksturin. Hinvegin hevur framhaldandi høgi oljuprísurin tyngt um raksturin. Samanlagt verður úrslitið í 2013 vænatndi ikki betri enn í 2012.

***Línuskip***
Línuskipini hava framhaldandi havt nøkur vánalig ár. Skipatalið er fallið frá 22 til 16 frá 2008 til 2012. Vánaliga gongdin hevur havt við sær, at  soliditeturin er fallin og er við árslok 2012 bert 9% samlað fyri henda partin av flotanum. Veiðuvirðið pr. dag fall frá 2008 til 2009, fyri at hækka nakað aftur frá 2009  til 2010. Síðani 2010 hevur veiðuvirðið verið støðugt, men tó alt ov lágt til at geva ein nøktandi rakstur. Flotin er gamal og í nógvar mátar ótíðarhóskandi. Verandi gongd kann tískil ikki halda fram. Um ikki broyting kemur í má tískil roknast við, at fleiri reiðarí mugu gevast við rakstrinum, og skipatalið tískil kemur at lækka enn meira.

Línuskipini hava sum kunnugt havt møguleika at royna eftir toski á Flemish Cap og hevur hesin fiskiskapur í 2013 roynst væl, prísurin hevur tó verið lágur og hevur tískil avmarka íkasti til raksturin. Ábendingar eru um at fiskiskapurin undir Føroyum roynist betri enn undanfarin ár. Íslandskvotan er á sama støðið sum árini frammanundan. Tað er tískil okkara meting at úrslitið fyri 2013, verður frægari enn í 2012, men tó ikki nøktandi.

***Garnaskip***
Talið av skipum í hesum bólkinum er frá 2008 til 2012 fallið úr 7 til 4. Raksturin hevur givið hall øll árini. Úrslitini hava tó verið heldur frægari í 2011 og 2012 enn árini frammanundan. Gjaldførið hevur verið versnandi í tíðarskeiðnum, soliditeturin er tó batnaður og er nøktandi við árslok 2012.

Sambært tølum frá FF fyri fyrstu 6 mánaðirnar í 2013 er veiðinøgdin hækkað nakað samstundis sum prísurin er á leið tann sami sum í 2012. Væntandi verður úrslitið hjá hesum skipabólki eitt vet betri enn í 2012.

Tórshavn, tann 23. september 2013

**JANUAR**
løggilt grannskoðanarvirki P/F

| | |
|---|---|
| Fróði Sivertsen | Christina á Bøgarði |
| statsaut. revisor | grannskoðari |

# Allur flotin

## Luttakandi skip

Á talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu nógv skip umboða teir ymsu skipabólkarnar í greiningini.

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tal av skipum** | | | | | |
| Pelagisk skip | 11 | 9 | 8 | 11 | 11 |
| Rækjuskip | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 |
| Verksmiðjutrolarar | 4 | 3 | 4 | 3 | 3 |
| Partrolarar | 17 | 26 | 22 | 24 | 24 |
| Lemmatrolarar | 11 | 8 | 8 | 8 | 10 |
| Línuskip | 22 | 19 | 16 | 17 | 16 |
| Garnaskip | 7 | 6 | 6 | 4 | 4 |
| Onnur skip | 1 | 1 | 1 | 1 | 0 |
| **Í alt** | **76** | **75** | **68** | **70** | **70** |

Eingi skip eru í bólkinum "Onnur skip" fyri 2012 og er hesin bólkurin tí ikki tikin við í greiningina, men er innroknaður í samlaða flotan frá 2008 til 2011. Samlaða skipatalið er fallið frá 76 skipum í 2008 til 70 skip í 2012.

Av ymiskum orsøkum hevur ikki borið til at hava eitt skip við í greiningini, av tí at felagið ikki hevur latið inn roknskap fyri 2012.

Á talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir fiskiskip, sum eru størri enn 110 tons ella hava eina maskinorku yvir 400 HK, og sum ikki eru við í roknskapargreiningini.

| Skip | Søluvirði í 2012 (t.kr.) | Veiða í 2012 (tons) | Bólkur | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| Hoyvíkingur | 3.677 | 316 | Línuskip | Undir avtøku |
| **Tilsamans** | **3.677** | **316** | | |

# Rakstur 2008 til 2012

Á talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu raksturin samanlagt hevur verið fyri fiskiflotan frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 76 | 75 | 68 | 70 | 70 | | |
| Nettosøla | 1.581.363 | 1.399.044 | 1.861.699 | 2.092.021 | 2.141.098 | *35,4%* | *2,3%* |
| Broyting í goymslu liðugvøra | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Aðrar inntøkur | 474 | 227 | 0 | 7.373 | 0 | *-100,0%* | *-100,0%* |
| Annar kostnaður | -808.410 | -685.346 | -814.073 | -837.717 | -981.567 | *21,4%* | *17,2%* |
| **Bruttovinningur** | **773.427** | **713.925** | **1.047.626** | **1.261.677** | **1.159.531** | *49,9%* | *-8,1%* |
| Starvsfólkakostnaður | -605.733 | -507.268 | -658.772 | -729.959 | -733.652 | *21,1%* | *0,5%* |
| **Úrslit áðr. avskr. og rentur** | **167.694** | **206.657** | **388.854** | **531.718** | **425.879** | *154,0%* | *-19,9%* |
| Avskrivingar | -164.732 | -163.788 | -176.278 | -175.736 | -207.183 | *25,8%* | *17,9%* |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **2.962** | **42.869** | **212.576** | **355.982** | **218.696** | *7283,4%* | *-38,6%* |
| Úrslit dótturfelag/atknýtt felag | -4.220 | 812 | 11.511 | 19.451 | 11.795 | *-379,5%* | *-39,4%* |
| Niðurskriving av partabrøvum | 5.165 | -506 | 397 | -23.426 | -14.173 | - | - |
| Fíggjarinntøkur | 17.943 | 35.356 | 17.086 | 68.162 | 61.480 | *242,6%* | *-9,8%* |
| Fíggjarkostnaður | -218.036 | -147.677 | -110.884 | -137.063 | -97.487 | *-55,3%* | *-28,9%* |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **-196.186** | **-69.146** | **130.686** | **283.106** | **180.311** | ***191,9%*** | ***-36,3%*** |
| Óvanligar inntøkur | 316.455 | 24.250 | 80.008 | 582 | 0 | *-100,0%* | *-100,0%* |
| Óvanligur kostnaður | -2.689 | -4.500 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **117.580** | **-49.396** | **210.694** | **283.688** | **180.311** | ***53,4%*** | ***-36,4%*** |
| Skattur av ársúrsliti | -33.930 | -3.478 | -55.593 | -61.180 | -49.750 | *46,6%* | *-18,7%* |
| **Ársúrslit** | **83.650** | **-52.874** | **155.101** | **222.508** | **130.561** | ***56,1%*** | ***-41,3%*** |
| Tons íalt | 437.393 | 270.639 | 303.893 | 295.615 | 311.382 | *-28,8%* | *5,3%* |
| Miðalprísur | 3,62 | 5,17 | 6,13 | 7,08 | 6,88 | *90,2%* | *-2,8%* |
| Dagar á fiskileið (mynstring) | 18.134 | 18.315 | 16.044 | 16.383 | 16.800 | *-7,4%* | *2,5%* |
| Søla pr. dag (tkr.) | 87 | 76 | 116 | 128 | 127 | *46,1%* | *-0,2%* |
| Ársverk | 901 | 871 | 775 | 822 | 844 | *-6,3%* | *2,7%* |

Samanumtikið kann sigast um raksturin hetta tíðarskeiðið, at bæði veiðan og ársúrslitið hava verið skiftandi. Verður hugt eftir ársúrslitinum, sæst ein stór afturgongd frá 2008 til 2009. Frá 2009 til 2011 sæst aftur ein framgongd, men aftur ein lítil afturgongd í 2012.

Hægsta veiðunøgdin var at síggja í 2008, meðan hægsti meðalprísurin er at síggja í 2011. Um hugt verður eftir 2012 í mun til 2008 er veiðunøgdin fallin við 28,8%, meðan nettosølan er økt við 35,4%.

# Útgreiningar til rakstur

## *Nettosøla*

Á talvuni niðanfyri er ein útgreining av, hvussu nettosølan býtir seg millum vinnugreinarnar (kr. 1.000).

| Nettosøla | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | 548.376 | 443.873 | 776.020 | 1.027.230 | 1.075.772 | *96,2%* | *4,7%* |
| Rækjuskip | 116.379 | 116.865 | 98.362 | 84.933 | 99.222 | *-14,7%* | *16,8%* |
| Verksmiðjutrolarar | 280.070 | 235.332 | 297.694 | 288.252 | 283.536 | *1,2%* | *-1,6%* |
| Partrolarar | 215.329 | 286.528 | 315.600 | 333.856 | 341.319 | *58,5%* | *2,2%* |
| Lemmatrolarar | 139.650 | 126.906 | 129.476 | 130.415 | 147.478 | *5,6%* | *13,1%* |
| Línuskip | 213.970 | 135.246 | 178.701 | 181.194 | 177.888 | *-16,9%* | *-1,8%* |
| Garnaskip | 45.299 | 37.030 | 35.397 | 29.860 | 15.883 | *-64,9%* | *-46,8%* |
| Onnur skip | 22.290 | 17.264 | 30.449 | 16.281 | - | - | - |
| **Í alt** | **1.581.363** | **1.399.044** | **1.861.699** | **2.092.021** | **2.141.098** | ***35,4%*** | ***2,3%*** |

Talvan vísir, at samanlagda søluvirðið er hækkað við 35,4% í tíðarskeiðinum. Av talvuni sæst greitt, at tað er økingin í nettosøluni hjá pelagiska flotanum frá 2010, sum er orsøkin til økingina í samlaðu nettosøluni. Um pelagiski flotin verður hildin uttanfyri, er samlaða veiðuvirði nærum óbroytt frá 2008 til 2010. Høvðusorsøkin til økingina í veiðuvirðinum frá 2010 er tískil økta makrelkvotan.

Eisini partrolararnir hava havt stóra framgongd í nettosøluni frá 2008 til 2012, hetta kemst serliga av, at talið av skipum er økt í bólkinum.

Verksmiðjuskipini hava havt eina lítla framgongd, meðan restin av flotanum hevur havt afturgongd.

## *Hýrur (og lønir)*

Talvan niðanfyri vísir, hvussu hýrur og lønir eru samansettar hesi 5 árini (kr. 1.000).

| Hýrur/lønir | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | -179.691 | -141.073 | -236.944 | -306.277 | -318.777 | *77,4%* | *4,1%* |
| Rækjuskip | -38.394 | -39.550 | -26.618 | -27.051 | -29.642 | *-22,8%* | *9,6%* |
| Verksmiðjutrolarar | -107.399 | -85.009 | -119.747 | -117.932 | -114.031 | *6,2%* | *-3,3%* |
| Partrolarar | -83.424 | -109.967 | -119.440 | -121.795 | -122.295 | *46,6%* | *0,4%* |
| Lemmatrolarar | -60.678 | -49.112 | -51.601 | -48.780 | -52.438 | *-13,6%* | *7,5%* |
| Línuskip | -104.399 | -56.170 | -78.954 | -84.581 | -85.108 | *-18,5%* | *0,6%* |
| Garnaskip | -24.171 | -19.495 | -17.890 | -13.902 | -11.361 | *-53,0%* | *-18,3%* |
| Onnur skip | -7.577 | -6.892 | -7.578 | -9.641 | - | - | - |
| **Í alt** | **-605.733** | **-507.268** | **-658.772** | **-729.959** | **-733.652** | ***21,1%*** | ***0,5%*** |

Til hesa talvu kann viðmerkjast, at hýran er hækkað við 21,1% frá 2008 til 2012. Hýran er hækkað við 0,5% frá 2011 til 2012.

Verður hugt eftir, hvør skipabólkur hevur rindað ta størstu upphæddina í hýrum, sæst, at pelagisku skipini liggja hægst øll árini. Parturin av samlaðu hýrunum hjá pelagisku skipunum er soleiðis øktur úr ca. 30% í 2008 til ca. 43% í 2012. Um pelagisku skipini verða hildin uttanfyri uppgerðina eru útgoldnar hýrur nærum óbroyttar frá 2008 til 2012.

Niðanfyri er ein talva, sum vísir, hvussu stór hýran er í mun til søluvirðið hjá teimum einstøku skipabólkunum.

| Hýru/lønar-% | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | 32,8% | 31,8% | 30,5% | 29,8% | 29,6% | *-9,6%* | *-0,6%* |
| Rækjuskip | 33,0% | 33,8% | 27,1% | 31,8% | 29,9% | *-9,4%* | *-6,2%* |
| Verksmiðjutrolarar | 38,3% | 36,1% | 40,2% | 40,9% | 40,2% | *4,9%* | *-1,7%* |
| Partrolarar | 38,7% | 38,4% | 37,8% | 36,5% | 35,8% | *-7,5%* | *-1,8%* |
| Lemmatrolarar | 43,5% | 38,7% | 39,9% | 37,4% | 35,6% | *-18,2%* | *-4,9%* |
| Línuskip | 48,8% | 41,5% | 44,2% | 46,7% | 47,8% | *-1,9%* | *2,5%* |
| Garnaskip | 53,4% | 52,6% | 50,5% | 46,6% | 71,5% | *34,1%* | *53,6%* |
| Onnur skip | 34,0% | 39,9% | 24,9% | 59,2% | - | - | - |
| **Í alt** | **38,3%** | **36,3%** | **35,4%** | **34,9%** | **34,3%** | ***-10,5%*** | ***-1,8%*** |

Henda talvan vísir, at tað er rættiliga ymiskt, hvussu stórt hýru-% er hjá teimum einstøku skipabólkunum.

Við undantaki av verksmiðjutrolarunum hava hýrur/lønir í % verið lækkandi í mun til nettosøluna frá 2008 til 2012. Størst hevur henda lækkingin verið í bólkinum fyri lemmatrolarar.

## *Annar kostnaður*

Samanlagdi rakstrarroknskapurin fyri øll skipini vísir, at posturin "annar kostnaður", sum umfatar eina røð av kostnaðum so sum olju, fiskireiðskap, viðlíkahald, tryggingar o.a., er hækkaður við 21,4%. Við undantak av 2009 hevur posturin tó verið javnt hækkandi gjøgnum tíðarskeiðið. Orsøkin til lægra kostnaðin í 2009 er tann lægri oljuprísurin í mun til restina av tíðarskeiðnum. Fra 2011 til 2012 er hesin postur hækkaður við 17,2%.

Talvan niðanfyri lýsir, hvussu býtið er millum skipabólkarnar (kr. 1.000).

| Annar kostnaður | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | -238.145 | -166.791 | -265.922 | -378.718 | -428.429 | *79,9%* | *13,1%* |
| Rækjuskip | -67.073 | -64.071 | -60.695 | -37.155 | -50.447 | *-24,8%* | *35,8%* |
| Verksmiðjutrolarar | -146.465 | -113.464 | -104.623 | -88.393 | -110.837 | *-24,3%* | *25,4%* |
| Partrolarar | -129.118 | -156.207 | -185.712 | -166.755 | -200.054 | *54,9%* | *20,0%* |
| Lemmatrolarar | -82.296 | -80.104 | -73.223 | -71.771 | -92.364 | *12,2%* | *28,7%* |
| Línuskip | -105.886 | -76.242 | -88.333 | -82.960 | -95.454 | *-9,9%* | *15,1%* |
| Garnaskip | -23.951 | -20.190 | -16.257 | -13.944 | -3.982 | *-83,4%* | *-71,4%* |
| Onnur skip | -15.476 | -8.277 | -19.308 | 1.979 | - | - | - |
| **Í alt** | **-808.410** | **-685.346** | **-814.073** | **-837.717** | **-981.567** | ***21,4%*** | ***17,2%*** |

Sum tað framgongur, eiga pelagisk skip tann størsta partin av hesum posti í 2012, meðan partrolarar eiga 2. plássið.

## *EBITDA pr. bólk*

Talvan niðanfyri vísir EBITDA pr. bólk (kr. 1.000).

| EBITDA pr. bólk | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk skip | 130.540 | 136.009 | 273.154 | 349.608 | 328.566 | 151,7% | -6,0% |
| Verksmiðjutrolarar | 26.206 | 36.859 | 73.324 | 81.927 | 58.668 | 123,9% | -28,4% |
| Rækjuskip | 10.912 | 13.244 | 11.049 | 20.727 | 19.133 | 75,3% | -7,7% |
| Partrolarar | 2.787 | 20.354 | 10.448 | 45.306 | 18.970 | 580,7% | -58,1% |
| Lemmatrolarar | -3.324 | -2.310 | 4.652 | 9.864 | 2.676 | -180,5% | -72,9% |
| Garnaskip | -2.349 | -2.428 | 1.250 | 2.014 | 540 | 123,0% | -73,2% |
| Línuskip | 3.685 | 2.834 | 11.414 | 13.653 | -2.674 | -172,6% | -119,6% |
| Onnur skip | -763 | 2.095 | 3.563 | 8.619 | - | - | - |
| Tilsamans | **167.694** | **206.657** | **388.854** | **531.718** | **425.879** | **154,0%** | **-19,9%** |

Samanlagt er EBITDA fyri fiskiflotan hækkað í hesum tíðarskeiði, men sæst ein lækking frá 2011 til 2012 á 19,9%.

Pelagisk vinnan hevur størst EBITDA øll árini, og er størsti vøksturin at síggja hjá partrolarum. Hjá línuskipunum gerst EBITA negativt í 2012.

### *Avskrivingar*

Talvan niðanfyri lýsir avskrivingar (kr. 1.000).

| **Avskrivingar** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | ***Vøkstur 5 ár*** | ***Vøkstur 1 ár*** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | -66.252 | -86.199 | -92.050 | -98.536 | -99.540 | *50,2%* | *1,0%* |
| Rækjuskip | -8.009 | -7.533 | -5.093 | -5.625 | -5.494 | *-31,4%* | *-2,3%* |
| Verksmiðjutrolarar | -25.852 | -16.751 | -26.707 | -19.829 | -22.142 | *-14,4%* | *11,7%* |
| Partrolarar | -20.429 | -29.680 | -29.523 | -32.127 | -59.753 | *192,5%* | *86,0%* |
| Lemmatrolarar | -8.966 | -6.139 | -6.976 | -5.313 | -8.106 | *-9,6%* | *52,6%* |
| Línuskip | -30.233 | -12.151 | -11.235 | -11.923 | -11.271 | *-62,7%* | *-5,5%* |
| Garnaskip | -4.014 | -4.358 | -3.717 | -1.406 | -877 | *-78,2%* | *-37,6%* |
| Onnur skip | -977 | -977 | -977 | -977 | - | - | - |
| **Í alt** | **-164.732** | **-163.788** | **-176.278** | **-175.736** | **-207.183** | ***25,8%*** | ***17,9%*** |

Samanlagt eru avskrivingarnar hækkaðar 25,8% í tíðarskeiðinum og hækkaðu við 17,9% í 2011.

Pelagiska vinnan hevur størst avskrivingar øll árini, og síðani koma partrolarar og verksmiðjutrolarar.

### *Fíggjarpostar*

Næstu báðar talvurnar lýsa gongdina í ávikavist fíggjarinntøkum og fíggjarkostnaðum hjá teimum einstøku skipabólkunum (kr. 1.000).

| **Fíggjarinntøkur** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | ***Vøkstur 5 ár*** | ***Vøkstur 1 ár*** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | 11.713 | 12.215 | 8.887 | 55.381 | 29.476 | *151,7%* | *-46,8%* |
| Rækjuskip | 2 | 113 | 1.206 | 6 | 336 | *16700,0%* | *5500,0%* |
| Verksmiðjutrolarar | 1.235 | 1.453 | 2.485 | 10.290 | 3.354 | *171,6%* | *-67,4%* |
| Partrolarar | 1.271 | 8.705 | 3.768 | 501 | 3.655 | *187,6%* | *629,5%* |
| Lemmatrolarar | 698 | 189 | 387 | 1.733 | 412 | *-41,0%* | *-76,2%* |
| Línuskip | 2.463 | 12.321 | 156 | 92 | 24.214 | *883,1%* | *26219,6%* |
| Garnaskip | 555 | 336 | 192 | 150 | 33 | *-94,1%* | *-78,0%* |
| Onnur skip | 6 | 24 | 5 | 9 | - | - | - |
| **Í alt** | **17.943** | **35.356** | **17.086** | **68.162** | **61.480** | ***242,6%*** | ***-9,8%*** |

Størsti parturin av fíggjarinntøkunum hjá flotanum stendur pelagiska vinnan fyri. Undantøkini eru í 2009 og 2012 har línuskipini eiga stóran part av inntøkunum. Hesar inntøkur eru í sambandi við skuldarumlegging/eftirgeving hjá skipum í bólkinum fyri línuskip.

Fíggjarinntøkur fevna eisini um ikki staðfestan kursvinning av lánum í útlendskum gjaldoyra og av virðisbrøvum.

| **Fíggjarkostnaður** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | ***Vøkstur 5 ár*** | ***Vøkstur 1 ár*** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | -115.738 | -62.290 | -42.842 | -66.497 | -42.120 | *-63,6%* | *-36,7%* |
| Rækjuskip | -8.255 | -8.667 | -6.369 | -3.429 | -4.044 | *-51,0%* | *17,9%* |
| Verksmiðjutrolarar | -28.396 | -27.832 | -15.118 | -19.712 | -7.187 | *-74,7%* | *-63,5%* |
| Partrolarar | -25.233 | -26.092 | -27.783 | -21.752 | -23.191 | *-8,1%* | *6,6%* |
| Lemmatrolarar | -9.835 | -6.136 | -7.396 | -9.149 | -11.077 | *12,6%* | *21,1%* |
| Línuskip | -26.850 | -13.992 | -8.755 | -14.703 | -9.864 | *-63,3%* | *-32,9%* |
| Garnaskip | -2.398 | -1.864 | -1.911 | -1.249 | -4 | *-99,8%* | *-99,7%* |
| Onnur skip | -1.331 | -804 | -710 | -572 | - | - | - |
| **Í alt** | **-218.036** | **-147.677** | **-110.884** | **-137.063** | **-97.487** | ***-55,3%*** | ***-28,9%*** |

Sum tað framgongur, hava pelagisk skip tær størstu fíggjarkostnaðirnir øll árini. Fyrst í tíðarskeiðnum liggja verksmiðjutrolararnir næst, frá 2010 broytist hetta og síðani hava partrolararnir ligið næst.

Samanlagt lækkaðu fíggjarkostnaðirnir í tíðarskeiðinum við 55,3%, meðan tær lækkaðu við 28,9% frá 2011 til 2012. Største fallið í % er hjá verksmiðjutrolarunum, meðan tær hjá lemmatrolarunum eru hækkaðar við 12,6%.

Fíggjarkostnaðirnir fevna eisini um ikki staðfest kurstap av lánum í útlendskum gjaldoyra og av virðisbrøvum.

### *Úrslit áðrenn óvanligt*

Í fylgjandi talvu er gongdin í úrsliti áðrenn óvanligar postar lýst (kr. 1.000).

| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | ***Vøkstur 5 ár*** | ***Vøkstur 1 ár*** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | -34.437 | -265 | 159.672 | 235.379 | 213.881 | *-721,1%* | -9,1% |
| Rækjuskip | -5.350 | -2.843 | 313 | 11.608 | 9.982 | *-286,6%* | -14,0% |
| Verksmiðjutrolarar | -28.490 | -6.990 | 33.975 | 52.693 | 26.653 | *-193,6%* | -49,4% |
| Partrolarar | -41.627 | -26.030 | -43.766 | -8.072 | -59.385 | *42,7%* | 635,7% |
| Lemmatrolarar | -21.354 | -13.619 | -8.571 | -2.865 | -10.948 | *-48,7%* | 282,1% |
| Línuskip | -53.830 | -11.433 | -8.670 | -12.225 | 436 | *-100,8%* | -103,6% |
| Garnaskip | -8.033 | -8.304 | -4.148 | -491 | -308 | *-96,2%* | -37,3% |
| Onnur skip | -3.065 | 338 | 1.881 | 7.079 | - | - | - |
| **Í alt** | **-196.186** | **-69.146** | **130.686** | **283.106** | **180.311** | ***-191,9%*** | **-36,3%** |

Sum sæst á yvirlitinum omanfyri høvdu allir skipabólkar hall árini 2008 og 2009 áðrenn óvanligar postar. Síðani 2010 hava pelagiska vinnan, verksmiðjutrolararnir og rækjuskipini havt positiv úrslit meðan restin av flotanum hevur havt hall.

Tað er serliga pelagiska vinnan, ið hevur havt eina munandi framgongd síðani 2010. Hjá verksmiðjutrolarunum og rækjuskipum hava úrslitini síðani 2010 sveiggjað.

Til teir einstøku skipabólkarnar kann annars viðmerkjast:

Partrolararnir hava havt nøkur vánalig ár, og gevur 2012 største hallið. Vánaligu úrslitini hjá hesum bólki, eru umframt vánaligu raksturin merkt av niðurskrivingum.

Lemmatrolararnir hava givið hall øll árini.

Línuskipini hava givið hall øll árini undantikið 2012. Raksturin hevur verið vánaligur, úrslitið í 2012 er merkt av skuldarumlegging/eftirgeving.

Garnaskipini hava somuleiðis givið hall frá 2008.

## *Ársverk*

Talvan vísir, hvussu býtið av ársverkum er millum teir ymsu skipabólkarnar hesi 5 árini.

| Ársverk | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | 137 | 121 | 132 | 192 | 211 | *53,8%* | *9,6%* |
| Rækjuskip | 44 | 43 | 44 | 27 | 28 | *-35,7%* | *3,7%* |
| Verksmiðjutrolarar | 125 | 137 | 97 | 88 | 88 | *-29,5%* | *-0,8%* |
| Partrolarar | 119 | 167 | 142 | 156 | 170 | *43,1%* | *8,7%* |
| Lemmatrolarar | 107 | 77 | 69 | 71 | 87 | *-18,1%* | *22,7%* |
| Línuskip | 292 | 256 | 221 | 235 | 220 | *-24,7%* | *-6,1%* |
| Garnaskip | 66 | 58 | 56 | 39 | 40 | *-39,7%* | *2,1%* |
| Onnur skip | 12 | 13 | 13 | 13 | - | - | - |
| **Í alt** | **901** | **871** | **775** | **822** | **844** | ***-6,3%*** | ***2,7%*** |

Tað eru línuskipini, sum gjøgnum tíðarskeiðið hava havt tey flestu ársverkini. Talan hevur tó verið um eitt fall uppá 24,7% frá 2008 til 2012, hetta kemst av einum lækkandi skipatalið í bólkinum.

Talið av ársverkum í pelagisku vinnuni og hjá partrolarunum er økt í tíðarskeiðum 2008 til 2012. Talið av skipum í hesum bólkum er hækkað í tíðarskeiðnum.

Ársverkini vóru minkandi frá 2008 til 2010, men hækkað aftur frá 2010 til 2012. Samlað sæð er talan um eina minking á 6,3% í tíðarskeiðnum.

# Greining av aktivum

## *Aktiv í alt*

Á talvuni niðanfyri eru aktiv í alt fyri allar skipabólkarnar frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| AKTIV | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Goodwill / veiðiloyvi | 544.209 | 615.351 | 594.592 | 550.430 | 531.577 | *-2,3%* | *-3,4%* |
| | | | | | | | |
| Skip | 2.155.026 | 2.290.238 | 2.308.889 | 2.423.367 | 2.385.221 | *10,7%* | *-1,6%* |
| Bygningar | 4.423 | 3.674 | 4.294 | 7.432 | 7.519 | *70,0%* | *1,2%* |
| Rakstrartól og innbúgv | 8.052 | 9.126 | 15.850 | 13.717 | 9.612 | *19,4%* | *-29,9%* |
| Framgoldin kostn. nýbygn. | 217.975 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Annað | 9.882 | 662 | 314 | 336 | 310 | *-96,9%* | *-7,7%* |
| **Materiell støðisogn íalt** | **2.395.358** | **2.303.700** | **2.329.347** | **2.444.852** | **2.402.662** | ***0,3%*** | ***-1,7%*** |
| | | | | | | | |
| Kapitalpartar v.m. *) | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Onnur virðisbrøv | 17.518 | 12.965 | 11.976 | 8.586 | 7.079 | *-59,6%* | *-17,6%* |
| Egin partabrøv | 2.643 | 1.455 | 1.842 | 3.388 | 3.388 | *28,2%* | *0,0%* |
| Onnur áogn | 17.094 | 5.527 | 3.835 | 3.461 | 9.304 | *-45,6%* | *168,8%* |
| **Fíggjarlig støðisogn íalt** | **37.255** | **19.947** | **17.653** | **15.435** | **19.771** | ***-46,9%*** | ***28,1%*** |
| | | | | | | | |
| **STØÐISOGN ÍALT** | **2.976.822** | **2.938.998** | **2.941.592** | **3.010.717** | **2.954.010** | ***-0,8%*** | ***-1,9%*** |
| | | | | | | | |
| Vørugoymsla umborð | 66.499 | 88.046 | 69.315 | 146.022 | 161.757 | *143,2%* | *10,8%* |
| Vøru- og tænastuáogn | 191.457 | 160.809 | 128.663 | 131.228 | 179.346 | *-6,3%* | *36,7%* |
| Áogn atknýtt feløg | 301.583 | 279.102 | 376.848 | 429.033 | 396.894 | *31,6%* | *-7,5%* |
| Útsett skattaáogn | 589 | 1.836 | 1.845 | 2.860 | 3.223 | *447,2%* | *12,7%* |
| Onnur virðisbrøv | 34.080 | 26.125 | 20.144 | 67.609 | 90.670 | *166,1%* | *34,1%* |
| Onnur áogn | 75.325 | 71.705 | 66.034 | 114.077 | 192.669 | *155,8%* | *68,9%* |
| **Áogn íalt** | **669.533** | **627.623** | **662.849** | **890.829** | **1.024.559** | ***53,0%*** | ***15,0%*** |
| | | | | | | | |
| Tøkur peningur | 260.282 | 270.769 | 404.057 | 425.297 | 322.539 | *23,9%* | *-24,2%* |
| | | | | | | | |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | **929.815** | **898.392** | **1.066.906** | **1.316.126** | **1.347.098** | ***44,9%*** | ***2,4%*** |
| | | | | | | | |
| **AKTIV ÍALT** | **3.906.637** | **3.837.390** | **4.008.498** | **4.326.843** | **4.301.108** | ***10,1%*** | ***-0,6%*** |

*) Innanhýsis kapitalpartar eru eliminerаðir.

Sum tað framgongur so minkaði ognin árini 2008 og 2009, men hon øktist í 2010 og 2011. Samlað er ognin økt við 10,1% frá 2008 og 2012. Á næstu síðunum verða nakrir av mest týðandi postunum útgreinaðir.

## *Goodwill / veiðiloyvi*

Á talvuni niðanfyri er lýst, hvussu gongdin í goodwill/veiðiloyvi hevur verið seinastu 5 árini (kr. 1.000).

| Goodwill / veiðiloyvi | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | 402.698 | 486.594 | 461.207 | 428.561 | 392.027 | *-2,6%* | *-8,5%* |
| Rækjuskip | 8.639 | 7.479 | 6.319 | 7.779 | 6.429 | *-25,6%* | *-17,4%* |
| Verksmiðjutrolarar | 38.059 | 35.027 | 31.333 | 28.200 | 33.511 | *-11,9%* | *18,8%* |
| Partrolarar | 62.877 | 65.838 | 66.693 | 56.561 | 67.948 | *8,1%* | *20,1%* |
| Lemmatrolarar | 16.055 | 7.326 | 12.465 | 10.048 | 14.499 | *-9,7%* | *44,3%* |
| Línuskip | 14.602 | 11.763 | 15.775 | 17.381 | 14.649 | *0,3%* | *-15,7%* |
| Garnaskip | 1.279 | 1.324 | 800 | 1.900 | 2.514 | *96,6%* | *32,3%* |
| Onnur skip | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - | - |
| **Í alt** | **544.209** | **615.351** | **594.592** | **550.430** | **531.577** | ***-2,3%*** | ***-3,4%*** |

Goodwill/veiðiloyvi hækkaðu frá 2008 til 2009 við ca. 13%, síðani er goodwill/veiðuloyvi lækkað so líðandi. Samlað er talan um eina lækking á 2,3% frá 2008 til 2012.

## *Skip*

Á talvuni niðanfyri er lýst, hvussu gongdin í skipavirðinum hevur verið seinastu 5 árini (kr. 1.000).

| Skip | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | 794.216 | 899.691 | 1.114.190 | 1.118.913 | 1.100.102 | *38,5%* | *-1,7%* |
| Rækjuskip | 98.246 | 96.809 | 52.473 | 57.947 | 56.968 | *-42,0%* | *-1,7%* |
| Verksmiðjutrolarar | 476.043 | 490.018 | 387.585 | 404.288 | 389.481 | *-18,2%* | *-3,7%* |
| Partrolarar | 345.241 | 432.510 | 410.158 | 489.891 | 446.228 | *29,3%* | *-8,9%* |
| Lemmatrolarar | 112.100 | 101.060 | 106.536 | 116.151 | 221.824 | *97,9%* | *91,0%* |
| Línuskip | 257.446 | 213.604 | 188.464 | 187.024 | 148.692 | *-42,2%* | *-20,5%* |
| Garnaskip | 60.984 | 46.773 | 40.688 | 41.335 | 21.926 | *-64,0%* | *-47,0%* |
| Onnur skip | 10.750 | 9.773 | 8.795 | 7.818 | - | - | - |
| **Í alt** | **2.155.026** | **2.290.238** | **2.308.889** | **2.423.367** | **2.385.221** | ***10,7%*** | ***-1,6%*** |

Talvan vísir m.a., at skipavirðið er hækkað við 10,7% í tíðarskeiðinum. Frá at standa fyri 36% av samlaða skipavirðinum í 2008, stendur pelagiska vinnan fyri 46% av samlaða skipavirðinum við árslok 2012. Skipavirðini hjá lemmatrolarunum eru nærum tvífdaldað frá 2008 til 2012, hetta serliga orsakað av nýíløgum í 2012. Frá 2011 til 2012 eru skipavirðini lækkað við 1,6%.

Tey viðurskifti, ið ávirka skipavirðini, eru m.a.

- nýbygging (+)
- søla (-)
- handil innanfyri sama skipabólk ella millum teir skipabólkar, ið eru við í greiningini, til onnur virðir, enn tey roknskaparligu virðini (+/-)
- uppskrivingar (+)
- avskrivingar (-)
- niðurskrivingar (-)

## *Tøkur peningur*

Tøkur peningur er útgreinaður á talvuni niðanfyri (kr. 1.000).

| Tøkur peningur | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | 193.266 | 148.838 | 250.989 | 309.976 | 227.931 | *17,9%* | *-26,5%* |
| Rækjuskip | 117 | 3.084 | 586 | 4.468 | 1.706 | *1358,1%* | *-61,8%* |
| Verksmiðjutrolarar | 3.733 | 7.099 | 64.397 | 43.815 | 29.591 | *692,7%* | *-32,5%* |
| Partrolarar | 21.052 | 77.570 | 58.841 | 39.196 | 33.062 | *57,0%* | *-15,6%* |
| Lemmatrolarar | 19.230 | 13.217 | 10.689 | 11.932 | 11.477 | *-40,3%* | *-3,8%* |
| Línuskip | 10.224 | 8.868 | 8.881 | 12.848 | 15.982 | *56,3%* | *24,4%* |
| Garnaskip | 12.656 | 11.002 | 9.532 | 3.008 | 2.790 | *-78,0%* | *-7,2%* |
| Onnur skip | 4 | 1.091 | 142 | 54 | - | - | - |
| **Í alt** | **260.282** | **270.769** | **404.057** | **425.297** | **322.539** | ***23,9%*** | ***-24,2%*** |

Sum tað framgongur, er tøkið peningurin samanlagt hækkaður við 23,9%, talan er tó um eina lækking frá 2011 til 2012 á 24,2%. Pelagiska vinnan eigur størsta partin av tøka peninginum. Við árslok 2012 er parturin hjá pelagisku vinnuni 70,6%.

# Greining av passivum

### *Passiv í alt*

Á talvuni niðanfyri eru passiv í alt fyri allar skipabólkarnar frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| PASSIV | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Partapeningur | 281.291 | 285.104 | 281.144 | 280.509 | 284.276 | *1,1%* | *1,3%* |
| Uppskrivingargrunnur | 344.066 | 313.450 | 284.694 | 277.007 | 244.193 | *-29,0%* | *-11,8%* |
| Tiltakspeningur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Yvirkursur við emisión | 22.509 | 13.398 | 8.638 | 18.088 | 22.938 | *1,9%* | *26,8%* |
| Aðrar burturleggingar | 1.600 | 0 | 2.618 | 2.486 | 13.225 | *726,6%* | *432,0%* |
| Fluttur vinningur | 106.547 | 1.596 | 98.848 | -6.675 | 67.906 | *-36,3%* | - |
| **EGINOGN ÍALT** | **756.013** | **613.548** | **675.942** | **571.415** | **632.538** | ***-16,3%*** | ***10,7%*** |
| | | | | | | | |
| Útsettur skattur | 280.999 | 285.964 | 309.095 | 324.321 | 330.263 | *17,5%* | *1,8%* |
| Aðrar avsetingar | 596 | 507 | 518 | 790 | 859 | *44,1%* | *8,7%* |
| **AVSETINGAR ÍALT** | **281.595** | **286.471** | **309.613** | **325.111** | **331.122** | ***17,6%*** | ***1,8%*** |
| | | | | | | | |
| Langfreistað skuld | 1.629.598 | 1.856.499 | 1.788.331 | 1.450.987 | 1.759.694 | *8,0%* | *21,3%* |
| | | | | | | | |
| Avdráttir at gjalda næsta ár | 505.999 | 156.420 | 175.646 | 528.243 | 574.964 | *13,6%* | *8,8%* |
| Bankaskuld | 127.257 | 67.033 | 83.528 | 77.808 | 91.547 | *-28,1%* | *17,7%* |
| Ábyrgdarpeningur | 1.708 | 661 | 329 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Skuld til atknýtt feløg | 352.065 | 545.208 | 603.317 | 721.531 | 284.465 | *-19,2%* | *-60,6%* |
| Partafelagsskattur | 10.412 | 7.137 | 19.039 | 46.379 | 37.308 | *258,3%* | *-19,6%* |
| Vøru- og tænastuskuld | 106.925 | 112.613 | 100.586 | 109.996 | 136.746 | *27,9%* | *24,3%* |
| Vinningsbýti | 73.986 | 74.759 | 130.775 | 233.105 | 146.000 | *97,3%* | *-37,4%* |
| Onnur skuld | 61.079 | 117.041 | 121.392 | 262.268 | 306.724 | *402,2%* | *17,0%* |
| **SKULD ÍALT** | **2.869.029** | **2.937.371** | **3.022.943** | **3.430.317** | **3.337.448** | ***16,3%*** | ***-2,7%*** |
| | | | | | | | |
| **PASSIV ÍALT** | **3.906.637** | **3.837.390** | **4.008.498** | **4.326.843** | **4.301.108** | ***10,1%*** | ***-0,6%*** |

Talvan vísir, at eginognin er lækkað 16,3% frá 2008 til 2012, í sama tíðarskeiði er langfreistaða skuldin økt við 8%. Samlaða skuldin er økt við 16,3% frá 2008 til 2012.

Á næstu síðunum verða nakrir av mest týðandi postunum útgreinaðir.

## Eginogn

Talvan niðanfyri lýsir gongdina í eginpeningi hjá skipabólkunum (kr. 1.000).

| Eginogn | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | 425.269 | 119.587 | 135.293 | 368.571 | 419.882 | *-1,3%* | *13,9%* |
| Rækjuskip | -9.078 | -10.069 | -9.303 | 12.148 | 15.816 | *274,2%* | *30,2%* |
| Verksmiðjutrolarar | 358.886 | 338.213 | 453.024 | 422.633 | 385.389 | *7,4%* | *-8,8%* |
| Partrolarar | 28.180 | 223.654 | 169.658 | 113.900 | 80.014 | *183,9%* | *-29,8%* |
| Lemmatrolarar | 56.138 | 42.549 | 42.959 | 46.473 | 63.545 | *13,2%* | *36,7%* |
| Línuskip | 52.459 | 40.925 | 40.093 | 24.451 | 24.940 | *-52,5%* | *2,0%* |
| Garnaskip | 28.583 | 19.111 | 14.413 | 10.909 | 17.605 | *-38,4%* | *61,4%* |
| Onnur skip | -2.262 | 14 | 1.540 | 7.346 | - | - | - |
| **Í alt** | **938.175** | **773.984** | **847.677** | **1.006.431** | **1.007.191** | ***7,4%*** | ***0,1%*** |
| Innh. kap. partar elemin. | -182.162 | -160.436 | -171.735 | -435.016 | -374.653 | *105,7%* | *-13,9%* |
| **Eginogn aft. elimineringar** | **756.013** | **613.548** | **675.942** | **571.415** | **632.538** | ***-16,3%*** | ***10,7%*** |

Samlað er eginognin minkað við 16,3 hesi árini. Hon er tó hækkað 10,7% frá 2011 til 2012. Eliminering av kapitalpørtum millum skipabólkarnar ger, at eginognin hjá teimum einstøku skipabólkunum ikki kann samanberast við eginognina hjá samlaða fiskiflotanum.

## Veðskuld

Á talvuni niðanfyri er gongdin í veðskuld útgreinað (kr. 1.000).

| Veðskuld | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk vinna | 1.220.655 | 1.054.055 | 1.155.399 | 1.235.765 | 1.586.188 | *29,9%* | *28,4%* |
| Rækjuskip | 118.404 | 115.487 | 82.919 | 62.170 | 55.618 | *-53,0%* | *-10,5%* |
| Verksmiðjutrolarar | 148.400 | 161.448 | 62.447 | 56.837 | 53.055 | *-64,2%* | *-6,7%* |
| Partrolarar | 279.446 | 355.757 | 356.924 | 290.254 | 290.738 | *4,0%* | *0,2%* |
| Lemmatrolarar | 101.438 | 87.481 | 95.612 | 106.630 | 192.537 | *89,8%* | *80,6%* |
| Línuskip | 213.597 | 189.405 | 169.147 | 187.835 | 152.498 | *-28,6%* | *-18,8%* |
| Garnaskip | 43.807 | 38.836 | 33.182 | 32.507 | 4.024 | *-90,8%* | *-87,6%* |
| Onnur skip | 9.850 | 10.450 | 8.347 | 7.232 | - | - | - |
| **Í alt** | **2.135.597** | **2.012.919** | **1.963.977** | **1.979.230** | **2.334.658** | ***9,3%*** | ***18,0%*** |

Samlað er veðskuldin hækkað 9,3% í tíðarskeiðinum. Skipabólkurin pelagisk stendur við árslok 2012 fyri meira enn 2/3 av samlaðu veðskuldini.

# Pelagisk vinna

Á talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu raksturin samanlagt hevur verið fyri pelagisku skipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 11 | 9 | 8 | 11 | 11 | | |
| Nettosøla | 548.376 | 443.873 | 776.020 | 1.027.230 | 1.075.772 | *96,2%* | *4,7%* |
| Aðrar inntøkur | 0 | 0 | 0 | 7.373 | 0 | *-* | *-100,0%* |
| Annar kostnaður | -238.145 | -166.791 | -265.922 | -378.718 | -428.429 | *79,9%* | *13,1%* |
| **Bruttovinningur** | **310.231** | **277.082** | **510.098** | **655.885** | **647.343** | ***108,7%*** | ***-1,3%*** |
| Starvsfólkakostnaður | -179.691 | -141.073 | -236.944 | -306.277 | -318.777 | *77,4%* | *4,1%* |
| **Úrslit áðr. avskr. og rentur** | **130.540** | **136.009** | **273.154** | **349.608** | **328.566** | *151,7%* | *-6,0%* |
| Avskrivingar | -66.252 | -86.199 | -92.050 | -98.536 | -99.540 | *50,2%* | *1,0%* |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **64.288** | **49.810** | **181.104** | **251.072** | **229.026** | ***256,3%*** | ***-8,8%*** |
| Úrslit atknýtt felag | 0 | 0 | 11.644 | 18.778 | 6.923 | *-* | *-63,1%* |
| Virðisjavnan av partabrøvum | 5.300 | 0 | 879 | -23.355 | -9.424 | *-277,8%* | *-59,6%* |
| Fíggjarinntøkur | 11.713 | 12.215 | 8.887 | 55.381 | 29.476 | *151,7%* | *-46,8%* |
| Fíggjarkostnaður | -115.738 | -62.290 | -42.842 | -66.497 | -42.120 | *-63,6%* | *-36,7%* |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **-34.437** | **-265** | **159.672** | **235.379** | **213.881** | ***721,1%*** | *-9,1%* |
| Óvanligar inntøkur | 311.906 | 0 | 0 | 0 | 0 | *-100,0%* | *-* |
| Skattur av ársúrsliti | -48.475 | -5.956 | -30.094 | -47.760 | -45.703 | *-5,7%* | *-4,3%* |
| **Ársúrslit** | **228.994** | **-6.221** | **129.578** | **187.619** | **168.178** | ***-26,6%*** | ***-10,4%*** |
| Tons íalt | 341.647 | 168.374 | 203.916 | 193.195 | 211.108 | *-38,2%* | *9,3%* |
| Miðalprísur | 1,61 | 2,64 | 3,81 | 5,32 | 5,10 | *217,5%* | *-4,2%* |
| Dagar á fiskileið (mynstring) | 2.455 | 1.526 | 1.834 | 1.637 | 2.048 | *-16,6%* | *25,1%* |
| Søla pr. dag (tkr.) | 223 | 291 | 423 | 628 | 525 | *135,2%* | *-16,3%* |
| Ársverk | 137 | 121 | 132 | 192 | 211 | *53,8%* | *9,6%* |

Í sambandi við býti av kvotum av pelagiskum fiskasløgunum verður skilnaður gjørdur millum ídnaðarskip og nótaskip. Í okkara greining hava vit valt at taka bólkin ídnaðarskip, ið fiska pelagiskan fisk, við í uppgerðina fyri Pelagisku vinnuna. Mett er, at við at taka hesi skip við, fæst ein meiri fullfíggjað mynd av fiskiskapinum í tí pelagisku vinnuni.

Pelagiska vinnan hevur sum heild havt góð úrslit hetta 5 ára skeiðið, undantikið er tó árið 2009, har talan var um eitt lítið samlað hall. Her er tó vert at hava fyri eyga, at úrslitið í 2008 er í stóran mun ávirkað av óvanligum inntøkum í sambandi við skipasølur. Um hædd verður tikin fyri hesum, er eisini talan um eitt samlað hall í 2008.

Tíðarskeiðið 2010 – 2012 hava úrslitini verið góð hjá pelagisku vinnuni. Orsøkin til hetta er serliga tann økta makrelkvotan, sum Føroyar hava ásett sær síðani 2010. Nettosølan er økt munandi í tíðarskeiðnum. Um hugt verður eftir samlaðu veiðuni sæst, at veiðan var størst í 2008 341 t. tons og minst í 2009 168 t. tons. Árini 2010 – 2012 hevur samlaða veiðan ligið um 200 t. tons.

Miðalprísurin er øktur munandi hetta tíðarskeiðið úr 1,61 pr. kg í 2008 til 5,10 pr. kg í 2012. Høvðusorsøkin til hetta er tann, at tey dýraru fiskasløgini sild og makrelur er ein størri partur av veiðuni, eisini hevur talan verið um hækkandi prísir á pelagisku fiskasløgunum, hetta er serliga galdandi fyri sild og svartkjaft.

Annar kostnaður er nógv øktur í tíðarskeiðnum. Soleiðis er annar kostnaður øktur úr ca. 97 kr. pr. veiðudag í 2008 til ca. 209 kr. pr. veiðudag 2012. Hetta kemst helst av øðrvísi veiðumynstri trol/nót, eins og tann støðugt hækkandi oljuprísurin hevur sína ávirkan.

Starvsfólkakostnaðurin hevur verið lækkandi í tíðarskeiðnum úr ca 32,8 % í 2008 til ca. 29,6% í 2012.

Miðalaldurin hjá hesum parti av flotanum er 18 ár.

## Aktiv

Á talvuni niðanfyri eru aktiv í alt fyri pelagisku skipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 11 | 9 | 8 | 11 | 11 | | |
| Goodwill / veiðiloyvi | 402.698 | 486.594 | 461.207 | 428.561 | 392.027 | *-2,6%* | *-8,5%* |
| Skip | 794.216 | 899.691 | 1.114.190 | 1.118.913 | 1.100.102 | *38,5%* | *-1,7%* |
| Bygningar | 1.395 | 732 | 1.440 | 1.346 | 1.749 | *25,4%* | *29,9%* |
| Rakstrartól og innbúgv | 2.654 | 2.967 | 9.592 | 8.736 | 5.397 | *103,4%* | *-38,2%* |
| Framgoldin kostn. nýbygn. | 217.975 | 0 | 0 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Annað | 437 | 445 | 314 | 294 | 273 | *-37,5%* | *-7,1%* |
| **Materiell støðisogn íalt** | **1.016.677** | **903.835** | **1.125.536** | **1.129.289** | **1.107.521** | ***8,9%*** | ***-1,9%*** |
| Kapitalpartar v.m. | 166.244 | 149.259 | 160.903 | 415.361 | 343.807 | ***106,8%*** | *-17,2%* |
| Onnur virðisbrøv | 1.285 | 1.367 | 1.533 | 847 | 812 | *-36,8%* | *-4,1%* |
| Onnur áogn | 1.089 | 1.090 | 1.714 | 1.711 | 1.711 | *57,1%* | *0,0%* |
| **Fíggjarlig støðisogn íalt** | **168.618** | **151.716** | **164.150** | **417.919** | **346.330** | ***105,4%*** | ***-17,1%*** |
| **STØÐISOGN ÍALT** | **1.587.993** | **1.542.145** | **1.750.893** | **1.975.769** | **1.845.878** | ***16,2%*** | ***-6,6%*** |
| Vørugoymsla umborð | 16.947 | 39.245 | 28.304 | 81.108 | 97.470 | *475,1%* | *20,2%* |
| Vøru- og tænastuáogn | 90.505 | 55.384 | 71.948 | 80.445 | 108.238 | *19,6%* | *34,5%* |
| Áogn atknýtt feløg | 219.109 | 34.153 | 534 | 108.111 | 126.463 | *-42,3%* | *17,0%* |
| Útsett skattaáogn | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 | - | - |
| Onnur virðisbrøv | 657 | 724 | 787 | 66.345 | 89.436 | *13512,8%* | *34,8%* |
| Onnur áogn | 52.204 | 48.444 | 5.086 | 14.525 | 142.132 | *172,3%* | *878,5%* |
| **Áogn íalt** | **379.422** | **177.950** | **106.661** | **350.534** | **563.739** | ***48,6%*** | ***60,8%*** |
| Tøkur peningur | 193.266 | 148.838 | 250.989 | 309.976 | 227.931 | *17,9%* | *-26,5%* |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | **572.688** | **326.788** | **357.650** | **660.510** | **791.670** | ***38,2%*** | ***19,9%*** |
| **AKTIV ÍALT** | **2.160.681** | **1.868.933** | **2.108.543** | **2.636.279** | **2.637.548** | ***22,1%*** | ***0,0%*** |

Til aktivini kann verða nevnt, at talið av skipum lækkaði úr 11 skipum í 2008 til 8 skip í 2010, fyri síðani at økjast aftur til 11 skip í 2011. Talið er óbroytt 11 í 2012. Bókaða virði á skipum er hækkað við ca. 300 mió. kr. í tíðarskeiðnum, meðan bókaða virði á goodwill/loyvum er nærum óbroytt. Harumframt eru kapitalpartar øktir munandi í tíðarskeiðnum.

## Passiv

Á talvuni niðanfyri eru passiv í alt fyri pelagisku skipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 11 | 9 | 8 | 11 | 11 | | |
| | | | | | | | |
| Partapeningur | 157.824 | 135.584 | 135.584 | 157.584 | 158.084 | *0,2%* | *0,3%* |
| Uppskrivingargrunnur | 34.984 | 0 | 684 | 684 | 684 | *-98,0%* | *0,0%* |
| Tiltakspeningur | 0 | 0 | 0 | 1.737 | 0 | *-* | *-100,0%* |
| Yvirkursur við emisión | 606 | 606 | 606 | 606 | 606 | *0,0%* | *0,0%* |
| Aðrar burturleggingar | 0 | 0 | 0 | -632 | -421 | *-* | *-33,4%* |
| Fluttur vinningur | 231.855 | -16.603 | -1.581 | 208.592 | 260.929 | *12,5%* | *-25,1%* |
| **EGINOGN ÍALT** | **425.269** | **119.587** | **135.293** | **368.571** | **419.882** | ***-1,3%*** | ***13,9%*** |
| | | | | | | | |
| Útsettur skattur | 155.295 | 153.377 | 165.741 | 175.420 | 197.666 | *27,3%* | *12,7%* |
| Aðrar avsetingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | *-* | *-* |
| **AVSETINGAR ÍALT** | **155.295** | **153.377** | **165.741** | **175.420** | **197.666** | ***27,3%*** | ***12,7%*** |
| | | | | | | | |
| Langfreistað skuld | 823.345 | 987.609 | 1.077.966 | 836.132 | 1.126.077 | *36,8%* | *34,7%* |
| | | | | | | | |
| Avdráttir at gjalda næsta ár | 397.310 | 66.446 | 77.433 | 399.633 | 460.111 | *15,8%* | *15,1%* |
| Bankaskuld | 38.053 | 0 | 2.748 | 0 | 1.508 | *-96,0%* | *-* |
| Skuld til atknýtt feløg | 190.881 | 389.111 | 421.224 | 538.935 | 123.205 | *-35,5%* | *-77,1%* |
| Partafelagsskattur | 8.792 | 6.190 | 16.812 | 42.117 | 36.962 | *320,4%* | *-12,2%* |
| Vøru- og tænastuskuld | 19.329 | 26.388 | 22.007 | 29.142 | 40.019 | *107,0%* | *37,3%* |
| Vinningsbýti | 73.731 | 70.000 | 125.000 | 151.000 | 146.000 | *98,0%* | *-3,3%* |
| Onnur skuld | 28.676 | 50.225 | 64.319 | 95.329 | 86.118 | *200,3%* | *-9,7%* |
| **SKULD Í ALT** | **1.580.117** | **1.595.969** | **1.807.509** | **2.092.288** | **2.020.000** | ***27,8%*** | ***-3,5%*** |
| | | | | | | | |
| **PASSIV ÍALT** | **2.160.681** | **1.868.933** | **2.108.543** | **2.636.279** | **2.637.548** | ***22,1%*** | ***0,0%*** |

Sum tað framgongur, er eginognin lækkað tilsamans munandi frá 2008 til 2009 og er síðani hækkað aftur, soleiðis, at henda er á sama støði sum í 2008. Orsøkin til lækkandi eginognina er útgjalding av vinningsbýti frá feløgunum. Vert er í hesum sambandi at leggja til merkist, at talan er um í nærum øllum førum um vinningsbýti, sum verður flutt til móðurfelagið og tískil er ikki talan um vinningsbýti, sum verður útgoldið til endaliga partaeigarar.

Langfreistaða skuldin er hækkað í tíðarskeiðnum, talan er um eina hækking, ið svarar til hækkingina í skipavirðinum. Á talvuni á næstu síðu eru nøkur lyklatøl fyri henda skipabólkin.

| Analysa: | 2008 | | 2009 | | 2010 | | 2011 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Rentabilitetur* | | | | | | | | | | |
| Dekningsstig | 57% | | 62% | | 66% | | 64% | | 60% | |
| Ognaravkast | 3% | | 3% | | 9% | | 10% | | 9% | |
| Rakstraravkast | 42% | | -1% | | 17% | | 18% | | 16% | |
| Renting av eginogn | 54% | | -5% | | 96% | | 51% | | 40% | |
| Miðal renta fremmand skuld | 9% | | 6% | | 4% | | 5% | | 3% | |
| Miðal søluprisur | 1,61 | | 2,64 | | 3,81 | | 5,32 | | 5,10 | |
| Søla pr. dag til fiskiskap (kr.) | 223.371 | | 290.874 | | 423.130 | | 627.508 | | 525.279 | |
| *Gjaldføri* | | | | | | | | | | |
| Gjaldførisstig 1 | 0,73 | | 0,47 | | 0,45 | | 0,46 | | 0,78 | |
| Gjaldførisstig 2 | 0,76 | | 0,54 | | 0,49 | | 0,53 | | 0,89 | |
| *Soliditetur* | | | | | | | | | | |
| Soliditetsstig | 20% | | 6% | | 6% | | 14% | | 16% | |
| Gearing | 296% | | 881% | | 856% | | 335% | | 378% | |
| Søla | 548.376 | 100% | 443.873 | 100% | 776.020 | 100% | 1.027.230 | 100% | 1.075.772 | 100% |
| Annar kostnaður, óvanligt og skattur | -25.286 | -5% | 172.747 | 39% | 296.016 | 38% | 419.105 | 41% | 474.132 | 44% |
| Lønir | 179.691 | 33% | 141.073 | 32% | 236.944 | 31% | 306.277 | 30% | 318.777 | 30% |
| Renting og avskrivning | 164.977 | 30% | 136.274 | 31% | 113.482 | 15% | 114.229 | 11% | 114.685 | 11% |
| Urslit | 228.994 | 42% | -6.221 | -1% | 129.578 | 17% | 187.619 | 18% | 168.178 | 16% |

Tølini tala fyri seg og vísa eisini, at gongdin hjá pelagiska flotanum fyri tíðarskeiðið 2008 - 2012 kann býtast upp í tvey, árini 2008 og 2009 og árini 2010 – 2012. Hetta sæst serliga, um hugt verður at ognaravkastinum fyri árini, har ein munandi hækking sæst frá 2008/09 til 2010/12.

Renting av eginognini hevur verið skiftandi. Eitt annað, ið er vert at leggja til merkis er, at rakstraravkastið (*overskudsgrad)* hevur ligið støðugt síðani 2010. Gjaldførið er eisini skiftandi. Soliditeturin kann tykjast lágur, um gongdin hjá flotanum verður havd í huga. Hetta kemst av tí, at móðirfeløg eru hildin uttanfyri í okkara greining. Um hesa høvdu verið tikin við, hevði soliditeturin verið munandi hægri.

## Niðurstøða

Pelagisku skipini hava síðani 2010 klárað seg væl . Veiðuvirði og úrslit eru økt og hava ligið støðug høg í 2010 – 2012, hetta serliga orsakað av hægri kvotum fyri makrel. Henda gongdin væntast at halda sær í 2013.

## Útlit fyri 2013

Tað hevur ikki verið møguligt at fáa neyv hagtøl fyri miðalprís og veiðunøgd fyri fyrstu 8 mánaðirnar í 2013 samanborið við sama tíðarskeið í 2013. Tó eru ábendingar um, at úrslitið fyri 2013 kemur eisini at verða á góðari leið. Hetta serliga orsakað av eini øking í silda og svartkjaftakvotunum. Hetta kemur væntandi at kompensera fyri ein lægri miðal avreiðingarprís í 2013 enn í 2012.

**Yvirlit yvir skip**

Á talvuni niðanfyri eru tey skip, sum eru við í hesum skipabólki. Tey ár, har skip eru skift út ella hava skift eigara sambært Skipalistanum, eru merkt við 3 x'um (xxx).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tróndur í Gøtu | x | xxx | x | x | x |
| Norðborg | x | xxx | x | x | x |
| Chr. í Grótinum | xxx | | | x | x |
| Saksaberg | x | x | x | x | x |
| Finnur Fríði | x | x | x | x | x |
| Høgaberg | x | xxx | | xxx | x |
| Jupiter | x | x | x | x | x |
| Fagraberg | x | x | x | x | x |
| Næraberg / Atlantic Navigator | xxx | xxx | x | x | x |
| Atlantsfarið | xxx | x | x | x | x |
| Carlton | xxx | | | | |
| Farið | | | | x | |
| Slættaberg | | | | | x |

# Rækjuvinna

Á talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu raksturin samanlagt hevur verið fyri rækjuskipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | | |
| Nettosøla | 116.379 | 116.865 | 98.362 | 84.933 | 99.222 | *-14,7%* | *16,8%* |
| Annar kostnaður | -67.073 | -64.071 | -60.695 | -37.155 | -50.447 | *-24,8%* | *35,8%* |
| **Bruttovinningur** | **49.306** | **52.794** | **37.667** | **47.778** | **48.775** | ***-1,1%*** | ***2,1%*** |
| Starvsfólkakostnaður | -38.394 | -39.550 | -26.618 | -27.051 | -29.642 | *-22,8%* | *9,6%* |
| **Úrslit áðr. avskr. og rentur** | **10.912** | **13.244** | **11.049** | **20.727** | **19.133** | ***75,3%*** | ***-7,7%*** |
| Avskrivingar | -8.009 | -7.533 | -5.093 | -5.625 | -5.494 | *31,4%* | *2,3%* |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **2.903** | **5.711** | **5.956** | **15.102** | **13.639** | ***369,8%*** | ***-9,7%*** |
| Virðisjavnan av partabrøvum | 0 | 0 | -480 | -71 | 51 | - | *-171,8%* |
| Fíggjarinntøkur | 2 | 113 | 1.206 | 6 | 336 | *16700,0%* | *5500,0%* |
| Fíggjarkostnaður | -8.255 | -8.667 | -6.369 | -3.429 | -4.044 | *-51,0%* | *17,9%* |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **-5.350** | **-2.843** | **313** | **11.608** | **9.982** | ***286,6%*** | ***-14,0%*** |
| Óvanligar inntøkur | 584 | 652 | 584 | 582 | 0 | *-100,0%* | *-100,0%* |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-4.766** | **-2.191** | **897** | **12.190** | **9.982** | ***309,4%*** | ***-18,1%*** |
| Skattur av ársúrsliti | 0 | 0 | -132 | -454 | -1.814 | - | *299,6%* |
| **Ársúrslit** | **-4.766** | **-2.191** | **765** | **11.736** | **8.168** | ***271,4%*** | ***-30,4%*** |
| Tons íalt | 10.097 | 8.258 | 7.646 | 6.527 | 4.692 | *-53,5%* | *-28,1%* |
| Miðalprísur | 12,34 | 14,13 | 14,72 | 16,13 | 20,46 | *65,8%* | *26,9%* |
| Dagar á fiskileið (mynstring) | 1.102 | 1.055 | 891 | 777 | 645 | *-41,5%* | *-17,0%* |
| Søla pr. dag (tkr.) | 113 | 111 | 126 | 135 | 149 | *31,6%* | *9,9%* |
| Ársverk | 44 | 43 | 44 | 27 | 28 | *-35,7%* | *3,7%* |

Rækjuvinnan hevur í seinastu fimm árini vent negativu gongdini, sum henda vinna annars hevur verið í. Tíðarskeiðið hevur víst eitt støðugt batnandi úrslit tíðarskeiðið 2008 – 2011, úrslitið er tó fallið eitt vet í 2012. Høvðusorsøkin til hesa gongd, er ein hækkandi miðalprísur í øllum tíðarskeiðnum og miðalprísurin er hækkaðar við ca. 65 % í 2012 sæð í mun til 2008. Hækkandi miðalprísurin hevur sostatt kompenserað fyri eini lægri veiðunøgd.

Annar kostnaður hevur ligið millum 43,8% og 61,07% av nettosøluni, meðan starvsfólkakostnaðurin hevur verið millum 27,1% og 33,8% í tíðarskeiðnum.Talið av skipum er farið úr 3 til 2 skip í tíðarskeiðnum, miðalaldurin á rækjuskipum er 25 ár.

## Aktiv

Á talvuni niðanfyri eru aktiv í alt fyri rækjuskipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | | |
| Goodwill / veiðiloyvi | 8.639 | 7.479 | 6.319 | 7.779 | 6.429 | *-25,6%* | *-17,4%* |
| Skip | 98.246 | 96.809 | 52.473 | 57.947 | 56.968 | *-42,0%* | *-1,7%* |
| Rakstrartól og innbúgv | 0 | 15 | 13 | 12 | 10 | - | *-16,7%* |
| **Materiell støðisogn íalt** | **98.246** | **96.824** | **52.486** | **57.959** | **56.978** | ***-42,0%*** | ***-1,7%*** |
| Onnur virðisbrøv | 285 | 285 | 575 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Onnur áogn | 517 | 517 | 584 | 584 | 525 | *1,5%* | *-10,1%* |
| **Fíggjarlig støðisogn íalt** | **802** | **802** | **1.159** | **584** | **525** | ***-34,5%*** | ***-10,1%*** |
| **STØÐISOGN ÍALT** | **107.687** | **105.105** | **59.964** | **66.322** | **63.932** | ***-40,6%*** | ***-3,6%*** |
| Vørugoymsla umborð | 12.876 | 7.989 | 5.407 | 4.882 | 8.252 | *-35,9%* | *69,0%* |
| Vøru- og tænastuáogn | 10.553 | 15.720 | 7.778 | 6.699 | 12.459 | *18,1%* | *86,0%* |
| Áogn atknýtt feløg | 3.420 | 1.727 | 3.848 | 7.852 | 8.479 | *147,9%* | *8,0%* |
| Onnur áogn | 431 | 832 | 18.541 | 598 | 512 | *18,8%* | *-14,4%* |
| **Áogn íalt** | **27.280** | **26.268** | **35.574** | **20.031** | **29.702** | ***8,9%*** | ***48,3%*** |
| Tøkur peningur | 117 | 3.084 | 586 | 4.468 | 1.706 | *1358,1%* | *-61,8%* |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | **27.397** | **29.352** | **36.160** | **24.499** | **31.408** | ***14,6%*** | ***28,2%*** |
| **AKTIV ÍALT** | **135.084** | **134.457** | **96.124** | **90.821** | **95.340** | ***-29,4%*** | ***5,0%*** |

Samlaðu aktiv eru lækkað við 29,4 % seinastu árini, hetta serliga orsakað av at talið er lækkað úr 3 til 2 rækjuskip í bólkinum.

## Passiv

Á talvuni niðanfyri eru passiv í alt fyri rækjuskipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | | |
| Partapeningur | 22.753 | 23.953 | 23.953 | 16.753 | 16.753 | *-26,4%* | *0,0%* |
| Fluttur vinningur | -31.831 | -34.022 | -33.256 | -4.605 | -937 | *97,1%* | *79,7%* |
| **EGINOGN ÍALT** | **-9.078** | **-10.069** | **-9.303** | **12.148** | **15.816** | ***274,2%*** | ***-30,2%*** |
| Útsettur skattur | 0 | 0 | 132 | 587 | 2.400 | - | *308,9%* |
| **AVSETINGAR ÍALT** | **0** | **0** | **132** | **587** | **2.400** | **-** | ***308,9%*** |
| Langfreistað skuld | 97.554 | 90.386 | 53.943 | 52.031 | 46.288 | *-52,6%* | *-11,0%* |
| Avdráttir at gjalda næsta ár | 20.850 | 25.101 | 28.976 | 10.139 | 9.330 | *-55,3%* | *-8,0%* |
| Bankaskuld | 6.393 | 7.489 | 5.317 | 8.596 | 11.014 | *72,3%* | *28,1%* |
| Skuld til atknýtt feløg | 7.526 | 6.084 | 8.631 | 335 | 242 | *-96,8%* | *-27,8%* |
| Vøru- og tænastuskuld | 7.442 | 8.420 | 5.305 | 3.992 | 6.477 | *-13,0%* | *62,2%* |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Onnur skuld | 4.397 | 7.046 | 3.123 | 2.993 | 3.773 | *-14,2%* | *26,1%* |
| **SKULD Í ALT** | **144.162** | **144.526** | **105.295** | **78.086** | **77.124** | ***-46,5%*** | ***-1,2%*** |
| **PASSIV ÍALT** | **135.084** | **134.457** | **96.124** | **90.821** | **95.340** | ***-29,4%*** | ***5,0%*** |

Batnandi úrslitini í tíðarskeiðnum 2008 – 2012 hava havt við sær, at eginognin hjá hesum partinum av flotanum er støðugt økt, og er partapeningurin næstan vunnin inn aftur.

Skuldin er eisini minkað hetta tíðarskeiðið, hetta bæði orsakað av skipasølu, og at positivu úrslitini er nýtt til at minka um skuldini.

| Analysa: | 2008 | | 2009 | | 2010 | | 2011 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Rentabilitetur* | | | | | | | | | | |
| Dekningsstig | 42% | | 45% | | 38% | | 56% | | 49% | |
| Ognaravkast | 2% | | 4% | | 6% | | 17% | | 14% | |
| Rakstraravkast | -4% | | -2% | | 1% | | 14% | | 8% | |
| Renting av eginogn | I/R | | I/R | | -8% | | 97% | | 52% | |
| Miðal renta fremmand skuld | 6% | | 7% | | 7% | | 5% | | 6% | |
| Miðal søluprísur | 12,34 | | 14,13 | | 14,72 | | 16,13 | | 20,46 | |
| Søla pr. dag til fiskiskap (kr.) | 113.079 | | 110.602 | | 126.318 | | 135.454 | | 148.850 | |
| | | | | | | | | | | |
| *Gjaldføri* | | | | | | | | | | |
| Gjaldførisstig 1 | 0,31 | | 0,39 | | 0,60 | | 0,75 | | 0,75 | |
| Gjaldførisstig 2 | 0,59 | | 0,54 | | 0,70 | | 0,94 | | 1,02 | |
| | | | | | | | | | | |
| *Soliditetur* | | | | | | | | | | |
| Soliditetsstig | -7% | | -7% | | -10% | | 13% | | 17% | |
| Gearing | -1375% | | -1221% | | -948% | | 583% | | 421% | |
| | | | | | | | | | | |
| Søla | 116.379 | 100% | 116.865 | 100% | 98.362 | 100% | 84.933 | 100% | 99.222 | 100% |
| Annar kostnaður, óvanligt og skattur | 66.489 | 57% | 63.419 | 54% | 60.243 | 61% | 37.027 | 44% | 52.261 | 53% |
| Lønir | 38.394 | 33% | 39.550 | 34% | 26.618 | 27% | 27.051 | 32% | 29.642 | 30% |
| Renting og avskrivning | 16.262 | 14% | 16.087 | 14% | 10.736 | 11% | 9.119 | 11% | 9.151 | 9% |
| Úrslit | -4.766 | -4% | -2.191 | -2% | 765 | 1% | 11.736 | 14% | 8.168 | 8% |

Ognaravkastið (úrslit av primerum rakstri / aktiv í alt) hevur verið batnandi øll árini og má metast at vera komið á eitt nøktandi stigi í 2011 og 2012. Eginognin var negativ fram til 2010, men úrslitini fyri 2011 og 2012 hava havt við sær, at eginognin er vorðin positiv, soleiðis er soliditeturin hjá hesum parti av flotanum við árslok 17% - sum tó framhaldandi má metast at vera í lægra lagi. Tølini fyri gjaldføri vísa eitt batnandi gjaldføri í tíðarskeiðnum.

**Niðurstøða**

Gongdin hjá rækjuflotanum er vend í tíðarskeiðnum 2008 – 2012. Úrslitini fyri 2011 og 2012 mugu metast nøktandi, og hevur henda gongd havt við sær, at flotin hevur bøtt um sítt gjaldføri. Soliditeturin má tó framhaldandi metast at vera í lægra lagi.

**Útlit fyri 2013**

Tað hevur ikki verið møguligt at fáa neyv hagtøl viðvíkjandi miðalprísi og veiðinøgd fyri fyrstu 8 mánaðirnar í 2013 í mun til sama tíðarskeið í 2012. Tó sær út sum, at prísurin og veiðunøgd hevur hildið sær á nøkulunda sama stigið sum í 2012. Væntast kann tí, at hesin parturin av flotanum kemur at hava eitt positivt úrslit í 2013.

Tá talan bert er um 2 rækjuskip í bólkinum, kunnu minni broytingar fáa stóra broytingar á samlaðu gongdina.

**Yvirlit yvir skip**

Á talvuni niðanfyri eru tey skip, sum eru við í hesum skipabólki. Tey ár, har skip eru skift út ella hava skift eigara sambært Skipalistanum, eru merkt við 3 x'um (xxx).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Havborg (gamli South Island) | x | x | x | x | x |
| Artic Viking | x | x | x | x | x |
| Fríðborg | x | x | xxx | | |

# Verksmiðjutrolarar

Á talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu raksturin samanlagt hevur verið fyri verksmiðjutrolararnar frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 4 | 3 | 4 | 3 | 3 | | |
| Nettosøla | 280.070 | 235.332 | 297.694 | 288.252 | 283.536 | *1,2%* | *-1,6%* |
| Annar kostnaður | -146.465 | -113.464 | -104.623 | -88.393 | -110.837 | *-24,3%* | *25,4%* |
| **Bruttovinningur** | **133.605** | **121.868** | **193.071** | **199.859** | **172.699** | ***29,3%*** | ***-13,6%*** |
| Starvsfólkakostnaður | -107.399 | -85.009 | -119.747 | -117.932 | -114.031 | *6,2%* | *-3,3%* |
| **Úrslit áðr. avskr. og rentur** | **26.206** | **36.859** | **73.324** | **81.927** | **58.668** | ***123,9%*** | ***-28,4%*** |
| Avskrivingar | -25.852 | -16.751 | -26.707 | -19.829 | -22.142 | *-14,4%* | *11,7%* |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **354** | **20.108** | **46.617** | **62.098** | **36.526** | ***10218,1%*** | ***-41,2%*** |
| Úrslit atknýtt felag | -1.671 | -682 | 0 | 17 | 0 | *-100,0%* | *-100,0%* |
| Niðurskr. av partabrøvum | -12 | -37 | -9 | 0 | -6.040 | - | - |
| Fíggjarinntøkur | 1.235 | 1.453 | 2.485 | 10.290 | 3.354 | *171,6%* | *-67,4%* |
| Fíggjarkostnaðir | -28.396 | -27.832 | -15.118 | -19.712 | -7.187 | *-74,7%* | *-63,5%* |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **-28.490** | **-6.990** | **33.975** | **52.693** | **26.653** | ***193,6%*** | ***-49,4%*** |
| Óvanligar inntøkur | 0 | 0 | 79.017 | 0 | 0 | - | - |
| Óvanligur kostnaður | 0 | -4.500 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-28.490** | **-11.490** | **112.992** | **52.693** | **26.653** | ***-193,6%*** | ***-49,4%*** |
| Skattur av ársúrsliti | 3.563 | 1.403 | -27.623 | -10.736 | -3.646 | *-202,3%* | *-66,0%* |
| **Ársúrslit** | **-24.927** | **-10.087** | **85.369** | **41.957** | **23.007** | ***-192,3%*** | ***-45,2%*** |
| Tons íalt | 9.363 | 10.226 | 11.170 | 11.344 | 12.212 | *30,4%* | *7,7%* |
| Miðalprísur | 29,98 | 23,01 | 26,65 | 25,41 | 23,22 | *-22,5%* | *-8,6%* |
| Dagar á fiskileið (mynstring) | 982 | 923 | 894 | 790 | 881 | *-10,3%* | *11,5%* |
| Søla pr. dag (tkr.) | 286 | 255 | 333 | 365 | 322 | *12,6%* | *-11,8%* |
| Ársverk | 125 | 137 | 97 | 88 | 88 | *-29,5%* | *-0,8%* |

Við undantaki av 2009 hevur veiðivirðið hjá verksmiðjutrolarunum ligið støðugt millum 280 - 300 mió. kr. fyri tíðarskeiðið 2008 – 2012.

Verksmiðjutrolararnir høvdu hall av rakstrinum árini 2008 – 2009. Síðani 2010 hava skipini havt yvirskot av rakstrinum, úrslitið fyri 2010 er tó í stóran mun merkt av óvanligum inntøkum. Veiðunøgdin er økt øll árini, meðan miðalprísurin hevur verið skiftandi árini 2008 -2010, síðani 2010 er miðalprísurin fallin. Her skal tó takast hædd fyri, at verksmiðjutrolararnir í 2011 og 2012 hava luttikið í makrelfiskiskapinum við Føroyar – og hevur hetta havt við sær ein lægri miðalprís pr. kg.

Annar kostnaður hevur verið fallandi úr 52,3% í 2008 til 30,6% í 2010. Í 2012 er annar kostnaður hækkaður og er 39,1%. Starvsfólkakostnaðurin hevur ligið millum 36,2% og 41%, lægstur í 2009 og hægst í 2011.

Avskrivingar hava verið skiftandi millum 16,8 mio. kr. í 2009 og 26,7 mió. kr. i 2010. Eitt skip er farið úr flotanum í 2010, og hevur hetta ávirkað avskrivingarnar.

Miðalaldurin hjá hesum parti av flotanum er 24 ár.

## Aktiv

Á talvuni niðanfyri eru aktiv í alt fyri verksmiðjutrolararnar frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 4 | 3 | 4 | 3 | 3 | | |
| Goodwill / veiðiloyvi | 38.059 | 35.027 | 31.333 | 28.200 | 33.511 | *-11,9%* | *18,8%* |
| Skip | 476.043 | 490.018 | 387.585 | 404.288 | 389.481 | *-18,2%* | *-3,7%* |
| Rakstrartól og innbúgv | 3.370 | 3.547 | 3.423 | 2.832 | 2.330 | *-30,9%* | *-17,7%* |
| **Materiell støðisogn íalt** | **479.413** | **493.565** | **391.008** | **407.120** | **391.811** | ***-18,3%*** | ***-3,8%*** |
| Kapitalpartar v.m. | 2.312 | 533 | 533 | 2.533 | 902 | *-61,0%* | *-64,4%* |
| Onnur virðisbrøv | 0 | 0 | 320 | 1.956 | 360 | - | *-81,6%* |
| Onnur áogn | 5.887 | 2.616 | 0 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| **Fíggjarlig støðisogn íalt** | **8.199** | **3.149** | **853** | **4.489** | **1.262** | ***-84,6%*** | ***-71,9%*** |
| **STØÐISOGN ÍALT** | **525.671** | **531.741** | **423.194** | **439.809** | **426.584** | ***-18,8%*** | ***-3,0%*** |
| Vørugoymsla umborð | 21.041 | 23.676 | 14.601 | 37.868 | 36.668 | *74,3%* | *-3,2%* |
| Vøru- og tænastuáogn | 61.167 | 61.984 | 24.256 | 17.263 | 20.912 | *-65,8%* | *21,1%* |
| Áogn atknýtt feløg | 37.040 | 52.854 | 143.767 | 240.543 | 177.413 | *379,0%* | *-26,2%* |
| Onnur virðisbrøv | 26.043 | 20.168 | 17.074 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Onnur áogn | 6.209 | 6.232 | 32.771 | 7.307 | 34.421 | *454,4%* | *371,1%* |
| **Áogn íalt** | **151.500** | **164.914** | **232.469** | **302.981** | **269.414** | ***77,8%*** | ***-11,1%*** |
| Tøkur peningur | 3.733 | 7.099 | 64.397 | 43.815 | 29.591 | *692,7%* | *-32,5%* |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | **155.233** | **172.013** | **296.866** | **346.796** | **299.005** | ***92,6%*** | ***-13,8%*** |
| **AKTIV ÍALT** | **680.904** | **703.754** | **720.060** | **786.605** | **725.589** | ***6,6%*** | ***-7,8%*** |

Samlaðu aktivini eru hækkað ca. 6,6% frá 2008 til 2012. Í sama tíðarskeiði eru skipavirðini lækkað við ca. 18,2%, og virðið á goodwill/loyvum eru lækkað ca. 11,9%.

Áogn óalt er hækkað munandi, hetta serliga orsakað av munandi hækking í áogn hjá atknýttum feløgum.

## Passiv

Á talvuni niðanfyri eru passiv í alt fyri verksmiðjutrolararnar frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 4 | 3 | 4 | 3 | 3 | | |
| | | | | | | | |
| Partapeningur | 14.112 | 17.862 | 21.112 | 21.112 | 12.612 | *-10,6%* | *-40,3%* |
| Uppskrivingargrunnur | 200.087 | 207.467 | 175.487 | 175.487 | 175.487 | *-12,3%* | *0,0%* |
| Yvirkursur við emisión | 19.978 | 6.175 | 259 | 259 | 259 | *-98,7%* | *0,0%* |
| Fluttur vinningur | 124.709 | 106.709 | 256.166 | 225.775 | 197.031 | *58,0%* | *-12,7%* |
| **EGINOGN ÍALT** | **358.886** | **338.213** | **453.024** | **422.633** | **385.389** | ***7,4%*** | ***-8,8%*** |
| | | | | | | | |
| Útsettur skattur | 77.357 | 85.407 | 98.440 | 96.578 | 77.980 | *0,8%* | *-19,3%* |
| **AVSETINGAR ÍALT** | **77.357** | **85.407** | **98.440** | **96.578** | **77.980** | ***0,8%*** | ***-19,3%*** |
| | | | | | | | |
| Langfreistað skuld | 131.517 | 142.550 | 50.589 | 40.498 | 37.397 | *-71,6%* | *-7,7%* |
| | | | | | | | |
| Avdráttir at gjalda næsta ár | 16.883 | 18.898 | 11.858 | 16.339 | 15.658 | *-7,3%* | *-4,2%* |
| Bankaskuld | 59.360 | 46.649 | 63.509 | 62.011 | 72.464 | *22,1%* | *16,9%* |
| Skuld til atknýtt feløg | 4.355 | 204 | 4.387 | 31.004 | 34.798 | *699,0%* | *12,2%* |
| Partafelagsskattur | 365 | 0 | 1.919 | 3.285 | 0 | *-100,0%* | *-100,0%* |
| Vøru- og tænastuskuld | 19.798 | 25.735 | 15.071 | 18.254 | 24.431 | *23,4%* | *33,8%* |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | 0 | 75.000 | 0 | - | *-100,0%* |
| Vinningsbýtisskattur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Onnur skuld | 12.383 | 46.098 | 21.263 | 21.003 | 77.472 | *525,6%* | *268,9%* |
| **SKULD Í ALT** | **244.661** | **280.134** | **168.596** | **267.394** | **262.220** | ***7,2%*** | ***-1,9%*** |
| | | | | | | | |
| **PASSIV ÍALT** | **680.904** | **703.754** | **720.060** | **786.605** | **725.589** | ***6,6%*** | ***-7,8%*** |

Eginognin er hækkað við 7,4% síðani 2008. Langfreistað skuld hevur verið støðugt fallandi síðani 2008, bankaskuldin er tó hækkað nakað.

Samlaða skuldin er hækkað við 7,2% í tíðarskeiðinum frá 2008 til 2012.

| Analysa: | 2008 | | 2009 | | 2010 | | 2011 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Rentabilitetur* | | | | | | | | | | |
| Dekningsstig | 48% | | 52% | | 65% | | 69% | | 61% | |
| Ognaravkast | 0% | | 3% | | 6% | | 8% | | 5% | |
| Rakstraravkast | -9% | | -4% | | 29% | | 15% | | 8% | |
| Renting av eginogn | -7% | | -3% | | 19% | | 10% | | 6% | |
| Miðal renta fremmand skuld | 13% | | 11% | | 10% | | 14% | | 4% | |
| Miðal søluprísur | 29,98 | | 23,01 | | 26,65 | | 25,41 | | 23,22 | |
| Søla pr. dag til fiskiskap (kr.) | 285.815 | | 254.964 | | 332.991 | | 364.876 | | 321.834 | |
| *Gjaldføri* | | | | | | | | | | |
| Gjaldførisstig 1 | 1,19 | | 1,08 | | 2,39 | | 1,36 | | 1,17 | |
| Gjaldførisstig 2 | 1,37 | | 1,25 | | 2,52 | | 1,53 | | 1,33 | |
| *Soliditetur* | | | | | | | | | | |
| Soliditetsstig | 53% | | 48% | | 63% | | 54% | | 53% | |
| Gearing | 58% | | 62% | | 28% | | 28% | | 33% | |
| Søla | 280.070 | 100% | 235.332 | 100% | 297.694 | 100% | 288.252 | 100% | 283.536 | 100% |
| Annar kostnaður, óvanligt og skattur | 142.902 | 51% | 116.561 | 50% | 53.229 | 18% | 99.129 | 34% | 114.483 | 40% |
| Lønir | 107.399 | 38% | 85.009 | 36% | 119.747 | 40% | 117.932 | 41% | 114.031 | 40% |
| Renting og avskrivning | 54.696 | 20% | 43.849 | 19% | 39.349 | 13% | 29.234 | 10% | 32.015 | 11% |
| Úrslit | -24.927 | -9% | -10.087 | -4% | 85.369 | 29% | 41.957 | 15% | 23.007 | 8% |

Ognaravkastið hevur verið nakað skiftandi hesi 5 árini og liggur á 5% í 2010. Rentingin av eginognini var hægst í 2010 og er síðani fallin nakað og er 6% í 2012. Gjaldførið hevur verið stabilt frá 2008 til 2012, best var gjaldførið í 2010 og er síðani fallið nakað, men er framvegis nøktandi. Soliditeturin hjá hesum partinum av flotanum hevur verið stabilur og er góður.

## Niðurstøða

Verksmiðjutrolararnir høvdu hall í 2008 og 2009. Síðani 2010 hevur hesin parturin av flotanum hava avlop av rakstrinum. Verksmiðjutrolararnir hava øll árini havt nøktandi gjaldføri, og soliditeturin er góður.

## Útlit fyri 2013

Tað hevur ikki verið møguligt at fáa neyv hagtøl viðvíkjandi miðalprísi og veiðinøgd fyri fyrstu 8 mánaðirnar í 2013 í mun til sama tíðarskeið í 2012. Hesin skipabólkurin hevur fingið hægri kvotu í russiskum sjógvi, men samstundis eru veiðurættindi á Flemish Cap, sum verksmiðjutrolararnir hava havt atgongd til, latin øðrum at fiska í 2013. Prísurin á flaki hevur eisini verið fallandi í 2013. Hesi viðurskifti saman við útskifting/umvælingum av skipum í bólkinum koma væntandi at ávirka úrslitið negativt. Tískil má roknast við einum lakari úrsliti fyri henda partin av flotanum í 2013 enn árini 2011 og 2012.

## Yvirlit yvir skip

Í talvuni niðanfyri eru tey skip, sum eru við í hesum skipabólki. Tey ár, har skip eru skift út ella hava skift eigara sambært Skipalistanum, eru merkt við 3 x'um (xxx).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vesturvón | x | x | x | x | X |
| Skálaberg/Gadus | x | x | xxx | x | X |
| Sundaberg | x | xxx | | | |
| Enniberg | x | x | x | x | X |

# Partrolarar

Á talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu raksturin samanlagt hevur verið fyri partrolararnar frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 17 | 26 | 22 | 24 | 24 | | |
| Nettosøla | 215.329 | 286.528 | 315.600 | 333.856 | 341.319 | *58,5%* | *2,2%* |
| Annar kostnaður | -129.118 | -156.207 | -185.712 | -166.755 | -200.054 | *-54,9%* | *-20,0%* |
| **Bruttovinningur** | **86.211** | **130.321** | **129.888** | **167.101** | **141.265** | ***63,9%*** | ***-15,5%*** |
| Starvsfólkakostnaður | -83.424 | -109.967 | -119.440 | -121.795 | -122.295 | *-46,6%* | *-0,4%* |
| **Úrslit áðr. avskr. og rentur** | **2.787** | **20.354** | **10.448** | **45.306** | **18.970** | ***-580,7%*** | ***58,1%*** |
| Avskrivingar | -20.429 | -29.680 | -29.523 | -32.127 | -59.753 | *-192,5%* | *-86,0%* |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **-17.642** | **-9.326** | **-19.075** | **13.179** | **-40.783** | **-** | ***409,5%*** |
| Úrslit atknýtt felag | 0 | 930 | -676 | 0 | 934 | - | - |
| Niðurskr. av partabrøvum | -23 | -247 | 0 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Fíggjarinntøkur | 1.271 | 8.705 | 3.768 | 501 | 3.655 | *187,6%* | *629,5%* |
| Fíggjarkostnaður | -25.233 | -26.092 | -27.783 | -21.752 | -23.191 | *8,1%* | *-6,6%* |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **-41.627** | **-26.030** | **-43.766** | **-8.072** | **-59.385** | **-** | ***-635,7%*** |
| Óvanligar inntøkur | 0 | 23.116 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Óvanligur kostnaður | -50 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-41.677** | **-2.914** | **-43.766** | **-8.072** | **-59.385** | **-** | ***-635,7%*** |
| Skattur av ársúrsliti | 2.639 | -3.402 | -274 | -2.254 | 2.015 | *23,6%* | *189,4%* |
| **Ársúrslit** | **-39.038** | **-6.316** | **-44.040** | **-10.326** | **-57.370** | **-** | ***-455,6%*** |
| Tons íalt | 42.409 | 54.092 | 49.448 | 49.470 | 50.707 | *19,6%* | *2,5%* |
| Miðalprísur | 5,08 | 5,30 | 6,38 | 6,75 | 6,73 | *32,6%* | *-0,3%* |
| Dagar á fiskileið (mynstring) | 4.606 | 6.633 | 4.870 | 6.403 | 6.882 | *49,4%* | *7,5%* |
| Søla pr. dag (tkr.) | 47 | 43 | 65 | 52 | 50 | *6,1%* | *-4,9%* |
| Ársverk | 119 | 167 | 142 | 156 | 170 | *43,1%* | *8,7%* |

Partrolarar hava havt nøkur vánalig ár. Samlað hevur flotin havt hall øll hesi árini. Bert í 2011 hevur flotin yvirskot aftaná avskrivingar. Úrslitið í 2012 er eisini merkt av avskriving av støðisogn, sum hevur við sær, at úrsliti gerst verri enn tað annars hevði verið.

Samlaða veiðan hevur árini 2010 – 2012 ligið støðug á umleið 50 t. tons. pr. ár. Miðalprísurin er hækkaður frá 2008 til 2011 og hevur hildið sær í 2012. Hetta hevur havt við sær, at samlaða veiðuvirðið er økt í tíðarskeiðnum. Vert er tó at leggja til merkis, at bólkurin hevur brúkt munandi fleiri dagar á fiskileið árini 2010 – 2012, soleiðis at veiðuvirði pr. dag er fallið við ca. 23% frá 2010 til 2012.

Síðani 2010 hava partrolararnir luttikið í makrelfiskiskapinum við Føroyar, og hevur hetta verið við til at kompensera fyri versnandi upsafiskiskapinum hetta tíðarskeiðið. Hetta hevur tó ikki verið nóg mikið at venda negativu gongdini.

Annar kostnaður hevur ligið millum ca. 50 og 60% av samlaða søluvirðinum í tíðarskeiðnum. Lægst í 2011 og hægst í 2012. Gongdin í oljuprísinum hevur stóran týdning fyri partrolararnar, og oljuprísurin hevur, við undantaki av 2009 verið høgar.

Starvsfólkakostnaðurin í mun til samlaðu søluna hevur verið fallandi. Frá 38,6% í 2008 til 35,8% í 2012.

Vánaliga gongdin í tíðarskeiðnum hevur havt við sær, at talið av skipum, sum hava verið við í okkara kanning, hevur sveiggja nakað í tíðarskeiðnum. Men fyri árini 2011 og 2012 er talið 24, meðan talið í 2010 var 22.

Miðalaldurin hjá partrolarum er 22 ár.

## Aktiv

Á talvuni niðanfyri eru aktiv í alt fyri partrolararnar frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 17 | 26 | 22 | 24 | 24 | | |
| Goodwill / veiðiloyvi | 62.877 | 65.838 | 66.693 | 56.561 | 67.948 | *8,1%* | *20,1%* |
| Skip | 345.241 | 432.510 | 410.158 | 489.891 | 446.228 | *29,3%* | *-8,9%* |
| Bygningar | 0 | 0 | 0 | 272 | 258 | - | *-5,1%* |
| Rakstrartól og innbúgv | 817 | 1.965 | 2.335 | 1.695 | 1.344 | *64,5%* | *-20,7%* |
| Annað | 9.390 | 166 | 0 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| **Materiell støðisogn íalt** | **355.448** | **434.641** | **412.493** | **491.858** | **447.830** | ***26,0%*** | ***-9,0%*** |
| Kapitalpartar v.m. | 71 | 998 | 0 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Onnur virðisbrøv | 1.589 | 2.045 | 793 | 1.731 | 4.144 | *160,8%* | *139,4%* |
| Egin partabrøv | 832 | 1.244 | 1.631 | 1.148 | 1.148 | *38,0%* | *0,0%* |
| Onnur áogn | 106 | 90 | 90 | 577 | 682 | *543,4%* | *18,2%* |
| **Fíggjarlig støðisogn íalt** | **2.598** | **4.377** | **2.514** | **3.456** | **5.974** | ***129,9%*** | ***72,9%*** |
| **STØÐISOGN ÍALT** | **420.923** | **504.856** | **481.700** | **551.875** | **521.752** | ***24,0%*** | ***-5,5%*** |
| Vørugoymsla umborð | 3.701 | 6.337 | 7.159 | 3.319 | 5.021 | *35,7%* | *51,3%* |
| Vøru- og tænastuáogn | 13.480 | 13.175 | 9.577 | 15.979 | 21.658 | *60,7%* | *35,5%* |
| Áogn atknýtt feløg | 4.824 | 146.505 | 183.875 | 26.842 | 7.344 | *52,2%* | *-72,6%* |
| Útsett Skattaáogn | 0 | 380 | 0 | 1.172 | 1.447 | - | *23,5%* |
| Onnur virðisbrøv | 2.232 | 613 | 934 | 1.131 | 1.123 | *-49,7%* | *-0,7%* |
| Onnur áogn | 4.202 | 5.233 | 2.707 | 75.757 | 4.624 | *10,0%* | *-93,9%* |
| **Áogn íalt** | **28.439** | **172.243** | **204.252** | **124.200** | **41.217** | ***44,9%*** | ***-66,8%*** |
| Tøkur peningur | 21.052 | 77.570 | 58.841 | 39.196 | 33.062 | *57,0%* | *-15,6%* |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | **49.491** | **249.813** | **263.093** | **163.396** | **74.279** | ***50,1%*** | ***-54,5%*** |
| **AKTIV ÍALT** | **470.414** | **754.669** | **744.793** | **715.271** | **596.031** | ***26,7%*** | ***-16,7%*** |

Skipsvirðið hevur verið skiftandi tey seinastu árini, og kemst hetta av, ymiska talinum av skipum, sum eru komin og farin úr skipabólkinum. Samlað er skipavirðið økt við ca. 29,3% frá 2008 til 2012. Samlaða skipatalið í 2008 var 17, meðan tað í 2012 er 24. Frá 2011 til 2012 er samlaða skipavirðið fallið við ca. 8,9%.

Virðið av goodwill/loyvum hevur ligið støðugt í tíðarskeiðnum. Samlað er virðið hækkað við ca. 8,1% frá 2008 til 2012.

Tøki peningurin hækkaði munandi frá 2008 til 2009, síðani er hann støðugt fallin.

## Passiv

Á talvuni niðanfyri eru passiv í alt fyri partrolararnar frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 17 | 26 | 22 | 24 | 24 | | |
| | | | | | | | |
| Partapeningur | 19.652 | 53.813 | 51.873 | 48.409 | 44.011 | *124,0%* | *-9,1%* |
| Uppskrivingargrunnur | 45.846 | 45.846 | 45.846 | 45.846 | 45.846 | *0,0%* | *0,0%* |
| Tiltakspeningur | 200 | 200 | 200 | 200 | 1.132 | *466,0%* | *466,0%* |
| Yvirkursur við emisión | 0 | 4.692 | 4.692 | 13.692 | 4.778 | - | *-65,1%* |
| Aðrar burturleggingar | 0 | 0 | 378 | 878 | 878 | - | *0,0%* |
| Fluttur vinningur | -37.518 | 119.103 | 66.669 | 4.875 | -16.631 | *-55,7%* | *-441,1%* |
| **EGINOGN ÍALT** | **28.180** | **223.654** | **169.658** | **113.900** | **80.014** | ***183,9%*** | ***-29,8%*** |
| | | | | | | | |
| Útsettur skattur | 21.339 | 25.408 | 25.475 | 25.342 | 25.623 | *20,1%* | *1,1%* |
| **AVSETINGAR ÍALT** | **21.339** | **25.408** | **25.475** | **25.342** | **25.623** | ***20,1%*** | ***1,1%*** |
| | | | | | | | |
| Langfreistað skuld | 261.052 | 330.850 | 321.419 | 213.864 | 229.319 | *-12,2%* | *7,2%* |
| | | | | | | | |
| Avdráttir at gjalda næsta ár | 18.394 | 24.907 | 35.505 | 76.390 | 61.419 | *233,9%* | *-19,6%* |
| Bankaskuld | 3.673 | 4.077 | 5.302 | 2.958 | 2.363 | *-35,7%* | *-20,1%* |
| Ábyrgdarpeningur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Skuld til atknýtt feløg | 119.014 | 126.820 | 140.284 | 130.234 | 56.929 | *-52,2%* | *-56,3%* |
| Partafelagsskattur | 425 | 290 | 106 | 77 | 180 | *-57,6%* | *133,8%* |
| Vøru- og tænastuskuld | 14.749 | 14.349 | 18.396 | 25.566 | 21.855 | *48,2%* | *-14,5%* |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | 5.670 | 7.000 | 0 | - | *-100,0%* |
| Vinningsbýtisskattur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Onnur skuld | 3.588 | 4.314 | 22.978 | 119.940 | 118.329 | *3197,9%* | *-1,3%* |
| **SKULD Í ALT** | **420.895** | **505.607** | **549.660** | **576.029** | **490.394** | ***16,5%*** | ***-14,9%*** |
| | | | | | | | |
| **PASSIV ÍALT** | **470.414** | **754.669** | **744.793** | **715.271** | **596.031** | ***26,7%*** | ***-16,7%*** |

Eginognin hjá hesum parti av flotanum hækkaði munandi frá 2008 til 2009, hetta orsakað av hækking í kapitalgrundarlagnum hjá feløgum hjá hesum bólki. Síðani 2009 er eginognin støðugt lækkað, og kemst hetta av vánaligu gongdini hjá hesum bólkinum seinastu árini .

Samlaða skuldin hjá bólkinum er støðugt økt árini 2008 – 2011. Í 2012 er samlaða skuldin minkað nakað, hetta skal tó síggjast í samanhangi við postinum onnur áogn og áogn hjá atknýttum fyritøkum sum er lækkað tilsvarandi.

| **Analysa:** | 2008 | | 2009 | | 2010 | | 2011 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Rentabilitetur* | | | | | | | | | | |
| Dekningsstig | 40% | | 45% | | 41% | | 50% | | 41% | |
| Ognaravkast | -4% | | -1% | | -3% | | 2% | | -7% | |
| Rakstraravkast | -18% | | -2% | | -14% | | -3% | | -17% | |
| Renting av eginogn | -139% | | -3% | | -26% | | -9% | | -72% | |
| Miðal renta fremmand skuld | 9% | | 7% | | 7% | | 5% | | 6% | |
| Miðal søluprísur | 5,08 | | 5,30 | | 6,38 | | 6,75 | | 6,73 | |
| Søla pr. dag til fiskiskap (kr.) | 46.750 | | 43.197 | | 64.805 | | 52.141 | | 49.596 | |
| *Gjaldføri* | | | | | | | | | | |
| Gjaldførisstig 1 | 0,29 | | 1,39 | | 1,12 | | 0,44 | | 0,27 | |
| Gjaldførisstig 2 | 0,31 | | 1,43 | | 1,15 | | 0,45 | | 0,28 | |
| *Soliditetur* | | | | | | | | | | |
| Soliditetsstig | 6% | | 30% | | 23% | | 16% | | 13% | |
| Gearing | 1005% | | 161% | | 214% | | 257% | | 366% | |
| Søla | 215.329 | 100% | 286.528 | 100% | 315.600 | 1,0 | 333.856 | 100% | 341.319 | 100% |
| Annar kostnaður, óvanligt og skattur | 126.529 | 59% | 136.493 | 48% | 185.986 | 0,6 | 169.009 | 51% | 198.039 | 58% |
| Lønir | 83.424 | 39% | 109.967 | 38% | 119.440 | 0,4 | 121.795 | 36% | 122.295 | 36% |
| Renting og avskrivning | 44.414 | 21% | 46.384 | 16% | 54.214 | 0,2 | 53.378 | 16% | 78.355 | 23% |
| Úrslit | -39.038 | -18% | -6.316 | -2% | -44.040 | -0,1 | -10.326 | -3% | -57.370 | -17% |

Ognaravkastið hevur við undantaki av 2011 verið negativt øll árini. Tað sama ger seg galdandi við rentingini av eginognini, sum hevur verið negativ øll árini. Gjaldførið batnaði frá 2008 til 2009, men er síðani støðugt versnað og kann als ikki metast at vera nøktandi við árslok 2012.

Soliditeturin øktist frá 2008 til 2009 orsakað av kapitalhækkingum, síðani er hann støðugt fallin og er ikki nøktandi við árslok 2012.

**Niðurstøða**

Partrolarar hava havt nøkur vánalig ár. Hóast hækkandi veiðuvirði hevur ognaravkastið við undantaki av 2011 verið negativt øll árini. Vánaliga gongdin hevur havt við sær, at gjaldførið hjá bólkinum er versnað munandi, og er ikki nøktandi við árslok 2012.

Fíggjarstøðan hjá partrolaraflotanum er versnað seinni árini og er ikki nøktandi við árslok 2012.

**Útlit fyri 2013**

Um hugt verður eftir útlitunum fyri 2013, er okkara meting at gongdin verður á leið sum í 2012. Upsafiskiskapurin í vár var væl undir miðal, tað eru tó ávísar ábendingar um at fiskiskapurin hevur verið batnandi í seinastuni. Fiskiskapurin eftir gulllaksi hevur roynst betri enn í 2012, bæði orsaka av veiðunøgd og betri prísi. Nøkur pør hava eins og undanfarin ár fiskað makrel í 2013 og hevur hesin fiskiskapur givið eitt ávíst íkast í 2013. Hinvegin ger vánaligi upsafiskiskapurin, sum er høvuðsfiskaslagi hjá hesum parti av flotanum og framhaldandi høgi oljuprísurin í 2013, at úrslitið ikki kann væntast at verða stórt øðrvísi enn í 2012.

**Yvirlit yvir skip**

Á talvuni niðanfyri eru tey skip, sum eru við í hesum skipabólki. Tey ár, har skip eru skift út ella hava skift eigara sambært Skipalistanum, eru merkt við 3 x'um (xxx).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vestmenningur | x | x | x | x | x |
| Fram | x | x | x | x | x |
| Grønanes | x | x | x | xxx | x |
| Vesturtúgva | x | x | x | xxx | x |
| Vesturvarðin | | xxx | x | x | x |
| Vesturskin | | xxx | x | x | x |
| Ametyst | x | x | xxx | x | x |
| Jaspis | x | x | xxx | x | x |
| Safir | x | xxx | xxx | xxx | xxx |
| Smaragd | x | xxx | xxx | xxx | xxx |
| Eysturbúgvin | x | x | x | x | x |
| Vesturbúgvin | x | x | x | x | x |
| Nornagestur | x | x | | | |
| Columbus | x | x | | | |
| Nónhamar | | xxx | | | |
| Fjalshamar | | xxx | | | |
| Stelkur | x | x | x | xxx | x |
| Bakur | x | x | x | xxx | x |
| Vágfelli / Skúgvur | xxx | x | x | x | xxx |
| Hvannafelli / Munkur | | x | x | x | xxx |
| Vesturleiki/Borgarin/Breiðanes | | x | x | x | x |
| Vestursøki/Navarin/Hamranes | | x | x | x | x |
| Lerkur | x | x | x | xxx | x |
| Rókur | x | x | x | xxx | x |
| Edna | x | | | | |
| Falkur | x | x | x | xxx | x |
| Heykur | x | x | x | xxx | x |
| Polarhav | | | | x | x |
| Stjørnan | | | | x | x |

# Lemmatrolarar

Á talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu raksturin samanlagt hevur verið fyri lemmatrolararnar frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 11 | 8 | 8 | 8 | 10 | | |
| Nettosøla | 139.650 | 126.906 | 129.476 | 130.415 | 147.478 | *5,6%* | *13,1%* |
| Aðrar inntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Annar kostnaður | -82.296 | -80.104 | -73.223 | -71.771 | -92.364 | *12,2%* | *28,7%* |
| **Bruttovinningur** | **57.354** | **46.802** | **56.253** | **58.644** | **55.114** | ***-3,9%*** | ***-6,0%*** |
| Starvsfólkakostnaður | -60.678 | -49.112 | -51.601 | -48.780 | -52.438 | *-13,6%* | *7,5%* |
| **Úrslit áðr. avskr. og rentur** | **-3.324** | **-2.310** | **4.652** | **9.864** | **2.676** | ***-180,5%*** | ***-72,9%*** |
| Avskrivingar | -8.966 | -6.139 | -6.976 | -5.313 | -8.106 | *-9,6%* | *52,6%* |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **-12.290** | **-8.449** | **-2.324** | **4.551** | **-5.430** | ***-55,8%*** | ***-219,3%*** |
| Úrslit atknýtt felag | 173 | 802 | 762 | 0 | 3.907 | *2158,4%* | - |
| Niðurskr. av partabrøvum | -100 | -25 | 0 | 0 | 1.240 | *-1340,0%* | - |
| Fíggjarinntøkur | 698 | 189 | 387 | 1.733 | 412 | *-41,0%* | *-76,2%* |
| Fíggjarkostnaður | -9.835 | -6.136 | -7.396 | -9.149 | -11.077 | *12,6%* | *21,1%* |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **-21.354** | **-13.619** | **-8.571** | **-2.865** | **-10.948** | ***-48,7%*** | ***282,1%*** |
| Óvanligar inntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Óvanligur kostnaður | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-21.354** | **-13.619** | **-8.571** | **-2.865** | **-10.948** | ***-48,7%*** | ***282,1%*** |
| Skattur av ársúrsliti | 1.600 | 1.723 | 108 | 327 | 758 | *-52,6%* | *131,8%* |
| **Ársúrslit** | **-19.754** | **-11.896** | **-8.463** | **-2.538** | **-10.190** | ***-48,4%*** | ***301,5%*** |
| Tons íalt | 14.927 | 13.572 | 13.439 | 19.132 | 17.782 | *19,1%* | *-7,1%* |
| Miðalprísur | 9,36 | 9,35 | 9,63 | 6,82 | 8,29 | *-11,4%* | *21,7%* |
| Dagar á fiskileið (mynstring) | 2.308 | 2.273 | 2.356 | 1.921 | 2.250 | *-2,5%* | *17,1%* |
| Søla pr. dag (tkr.) | 61 | 56 | 55 | 68 | 66 | *8,3%* | *-3,5%* |
| Ársverk | 107 | 77 | 69 | 71 | 87 | *-18,1%* | *22,7%* |

Veiðumynstrið hjá hesum parti av flotanum er broytt seinastu árini, frá at skipini í hesum bólki royndu við lemmum til, at tey flestu skipini í hesum bólkinum nú partrola. Eisini eru lemmatrolararnir komnir undir fiskidagaskipanina frá 1. september 2010.

Talið av skipum er lækkað frá 2008 til 2009 úr 11 til 8 skip. Nettosølan hevur verið støðug frá 2009 – 2011, og hevur hetta, saman við lækkandi rakstrarkostnaði, havt við sær, at úrslitið er batnað. Talan hevur tó øll árini í tíðarskeiðnum verið um hall. Árini 2008 og 2009 var úrslit áðrenn avskrivingar og rentur (EBITDA) negativ. EBITDA hevur tó verið positivt árini 2010 – 2012, men bert í 2011 hevur úrslitið verið positivt eftir avskrivingar.

Skipini, sum eru komin í flotan í 2012 eru frystiskip, samstundis hava 2 onnur skip gjørt íløgu í frysting umborð. Av úrslitinum fyri 2012 sæst hetta ikki at hava hjálpt uppá raksturin hjá hesum skipabólki, men enn er ov tíðliga at gera nakra endaliga niðurstøðu viðvíkjandi frysting umborð.

Annar kostnaður fall frá 63% í 2009 til 55,2% í 2011 av samlaðu søluni. í 2012 er annar kostnaður hækkaður til 62,6% av samlaðu søluni.

Starvsfólkakostnaðurin er, við undantaki av 2010, fallin í mun til samlaðu søluna. Frá 43,6% í 2008 til 35,3% í 2012.

Í 2012 er talið av skipum økt úr 8 til 10.

Miðalaldurin hjá hesum skipabólki er 24 ár.

## Aktiv

Á talvuni niðanfyri eru aktiv í alt fyri lemmatrolararnar frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 11 | 8 | 8 | 8 | 10 | | |
| Goodwill / veiðiloyvi | 16.055 | 7.326 | 12.465 | 10.048 | 14.499 | *-9,7%* | *44,3%* |
| Skip | 112.100 | 101.060 | 106.536 | 116.151 | 221.824 | *97,9%* | *91,0%* |
| Bygningar | 0 | 0 | 0 | 0 | 863 | - | - |
| Rakstrartól og innbúgv | 131 | 169 | 215 | 338 | 456 | *248,1%* | *34,9%* |
| **Materiell støðisogn íalt** | **112.231** | **101.229** | **106.751** | **116.489** | **223.143** | ***98,8%*** | ***91,6%*** |
| Kapitalpartar v.m. | 3.906 | 4.041 | 4.823 | 11.824 | 13.090 | *235,1%* | *10,7%* |
| Onnur virðisbrøv | 13.051 | 8.221 | 8.221 | 2.841 | 1.086 | *-91,7%* | *-61,8%* |
| Egin partabrøv | 1.600 | 0 | 0 | 2.240 | 2.240 | *40,0%* | *0,0%* |
| Onnur áogn | 8.985 | 754 | 729 | 239 | 6.296 | *-29,9%* | *2534,3%* |
| **Fíggjarlig støðisogn íalt** | **27.542** | **13.016** | **13.773** | **17.144** | **22.712** | ***-17,5%*** | ***32,5%*** |
| **STØÐISOGN ÍALT** | **155.828** | **121.571** | **132.989** | **143.681** | **260.354** | ***67,1%*** | ***81,2%*** |
| Vørugoymsla umborð | 2.690 | 3.740 | 4.655 | 4.819 | 10.500 | *290,3%* | *117,9%* |
| Vøru- og tænastuáogn | 12.154 | 5.542 | 10.390 | 6.879 | 12.859 | *5,8%* | *86,9%* |
| Áogn atknýtt feløg | 5.772 | 5.266 | 6.409 | 9.660 | 11.716 | *103,0%* | *21,3%* |
| Onnur virðisbrøv | 2.342 | 1.814 | 1.003 | 108 | 85 | *-96,4%* | *-21,3%* |
| Onnur áogn | 7.803 | 3.521 | 4.523 | 4.625 | 4.455 | *-42,9%* | *-3,7%* |
| **Áogn íalt** | **30.761** | **19.883** | **26.980** | **26.091** | **39.965** | ***29,9%*** | ***53,2%*** |
| Tøkur peningur | 19.230 | 13.217 | 10.689 | 11.932 | 11.477 | *-40,3%* | *-3,8%* |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | **49.991** | **33.100** | **37.669** | **38.023** | **51.442** | ***2,9%*** | ***35,3%*** |
| **AKTIV ÍALT** | **205.819** | **154.671** | **170.658** | **181.704** | **311.796** | ***51,5%*** | ***71,6%*** |

Materiella støðisognin hevur verið fallandi árini 2008 – 2010 fyri síðani at hækka nógv í 2012. Orsøkin til hetta er nýíløga í frystiskip, umframt umbygging av verandi skipum til frysting. Hetta hevur við sær, at samlaðu aktivini eru økt við 51,5% frá 2008 til 2012.

## Passiv

Á talvuni niðanfyri eru passiv í alt fyri lemmatrolararnar frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 11 | 8 | 8 | 8 | 10 | | |
| | | | | | | | |
| Partapeningur | 28.778 | 18.168 | 18.168 | 15.293 | 28.791 | *0,0%* | *88,3%* |
| Uppskrivingargrunnur | 11.226 | 8.609 | 17.481 | 17.481 | 17.481 | *55,7%* | *0,0%* |
| Tiltakspeningur | 0 | 780 | 1.623 | 389 | 4.552 | *-* | *1070,2%* |
| Yvirkursur við emisión | 946 | 0 | 0 | 0 | 13.764 | *1355,0%* | *-* |
| Aðrar burturleggingar | 1.600 | 0 | 2.240 | 2.240 | 2.240 | *40,0%* | *0,0%* |
| Fluttur vinningur | 13.588 | 14.992 | 3.447 | 11.070 | -3.283 | *-124,2%* | *-129,7%* |
| **EGINOGN ÍALT** | **56.138** | **42.549** | **42.959** | **46.473** | **63.545** | ***13,2%*** | ***36,7%*** |
| | | | | | | | |
| Útsettur skattur | 5.564 | 4.577 | 6.240 | 5.290 | 4.693 | *-15,7%* | *-11,3%* |
| **AVSETINGAR ÍALT** | **5.564** | **4.577** | **6.240** | **5.290** | **4.693** | ***-15,7%*** | ***-11,3%*** |
| | | | | | | | |
| Langfreistað skuld | 82.874 | 78.888 | 82.804 | 91.486 | 179.859 | *117,0%* | *96,6%* |
| | | | | | | | |
| Avdráttir at gjalda næsta ár | 18.564 | 8.593 | 12.808 | 15.144 | 12.678 | *-31,7%* | *-16,3%* |
| Bankaskuld | 9.526 | 2.257 | 1.703 | 1.797 | 2.198 | *-76,9%* | *22,3%* |
| Ábyrgdarpeningur | 1.708 | 661 | 329 | 0 | 0 | *-100,0%* | *-* |
| Skuld til atknýtt feløg | 6.992 | 106 | 104 | 0 | 11.801 | *68,8%* | *-* |
| Partafelagsskattur | 186 | 147 | 124 | 124 | 166 | *-10,8%* | *33,9%* |
| Vøru- og tænastuskuld | 20.301 | 14.972 | 19.801 | 17.270 | 32.788 | *61,5%* | *89,9%* |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | *-* | *-* |
| Vinningsbýtisskattur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | *-* | *-* |
| Onnur skuld | 3.966 | 1.921 | 3.786 | 4.120 | 4.068 | *2,6%* | *-1,3%* |
| **SKULD Í ALT** | **144.117** | **107.545** | **121.459** | **129.941** | **243.558** | ***69,0%*** | ***87,4%*** |
| | | | | | | | |
| **PASSIV ÍALT** | **205.819** | **154.671** | **170.658** | **181.704** | **311.796** | ***51,5%*** | ***71,6%*** |

Eginognin er lækkað árini 2008 – 2010 hetta orsakað av vánaligu úrslitunum hjá bólkinum. Í 2011 og 2012 er eginognin hækkað, hetta orsakað av kapitalhækkingum í verandi feløgum, og stovnan av nýggjum feløgum í sambandi við skipakeyp. Samlað er eginognin økt við 13,2% frá 2008 - 2012.

Samlaða skuldin hjá hesum bólkinum er økt við 69% frá 2008 – 2012, høvðusorsøkin til hetta eru íløgunar, sum gjørdar eru í 2012.

| **Analysa:** | **2008** | | **2009** | | **2010** | | **2011** | | **2012** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Rentabilitetur* | | | | | | | | | | |
| Dekningsstig | 41% | | 37% | | 43% | | 45% | | 37% | |
| Ognaravkast | -6% | | -5% | | -1% | | 3% | | -2% | |
| Rakstraravkast | -14% | | -9% | | -7% | | -2% | | -7% | |
| Renting av eginogn | -35% | | -28% | | -20% | | -5% | | -16% | |
| Miðal renta fremmand skuld | 9% | | 7% | | 7% | | 8% | | 6% | |
| Miðal søluprísur | 9,36 | | 9,35 | | 9,63 | | 6,82 | | 8,29 | |
| Søla pr. dag til fiskiskap (kr.) | 60.507 | | 55.832 | | 54.956 | | 67.889 | | 65.546 | |
| *Gjaldføri* | | | | | | | | | | |
| Gjaldførisstig 1 | 0,77 | | 1,02 | | 0,85 | | 0,86 | | 0,64 | |
| Gjaldførisstig 2 | 0,82 | | 1,16 | | 0,97 | | 0,99 | | 0,81 | |
| *Soliditetur* | | | | | | | | | | |
| Soliditetsstig | 27% | | 28% | | 25% | | 26% | | 20% | |
| Gearing | 198% | | 211% | | 227% | | 233% | | 306% | |
| Søla | 139.650 | 100% | 126.906 | 100% | 129.476 | 100% | 130.415 | 100% | 147.478 | 100% |
| Annar kostnaður, óvanligt og skattur | 80.696 | 58% | 78.381 | 62% | 73.115 | 56% | 71.444 | 55% | 91.606 | 62% |
| Lønir | 60.678 | 43% | 49.112 | 39% | 51.601 | 40% | 48.780 | 37% | 52.438 | 36% |
| Renting og avskrivning | 18.030 | 13% | 11.309 | 9% | 13.223 | 10% | 12.729 | 10% | 13.624 | 9% |
| Úrslit | -19.754 | -14% | -11.896 | -9% | -8.463 | -7% | -2.538 | -2% | -10.190 | -7% |

Dekningsstigið hevur ligið millum 37 – 45%. Best í 2011 og vánaligast í 2009 og 2012. Ognaravkastið hevur verið negativt øll árini uttan í 2011, meðan rakstraravkast er negativt øll árini.

Gjaldførið hevur verið støðugt gjøgnum tíðarskeiðið, men er fallið nakað í 2012. Gjaldførið má metast at verða í lægra lagi. Soliditeturin hevur verið støðugur gjøgnum tíðarskeiðið, men er fallin í 2012. Við árslok er soliditeturin 20% og tískil ikki nøktandi.

**Niðurstøða**

Úrslitini hjá hesum parti av flotanum hava ikki verið nøktandi í árini 2008 – 2012, øll árini hava givið hall. Samanumtikið kann sigast, at fíggjarstøðan hjá hesum skipum ikki er nøktandi. Gjaldførið er versnað serliga í 2012. Soliditeturin er heldur ikki nøktandi.

**Útlit fyri 2013**

Vánaligi upsafiskiskapurin í 2013, hevur eisini ávirka gongdina hjá hesum parti av flotanum í 2013. Tey flestu av skipunum í hesum bólkinum hava, eins og árini frammanundan, luttikið í makrelfiskiskapinum og hevur hesin fiskiskapurin givið eitt ávíst íkast til raksturin. Hinvegin hevur framhaldandi høgi oljuprísurin tyngt um raksturin. Samanlagt verður úrslitið í 2013 væntandi ikki betri enn í 2012.

**Yvirlit yvir skip**

Á talvuni niðanfyri eru tey skip, sum eru við í hesum skipabólki. Tey ár, har skip eru skift út ella hava skift eigara sambært Skipalistanum, eru merkt við 3 x'um (xxx).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Sjagaklettur | x | x | x | xxx | x |
| Steintór | x | x | x | x | x |
| Niels Pauli | x | x | x | x | x |
| Brestir | x | x | x | x | x |
| Beinisvørð | xxx | x | x | x | x |
| Vesturskin | x | | | | |
| Rankin | xxx | x | x | x | x |
| Suðringur | x | x | x | x | x |
| Vesturleiki | x | x | x | xxx | x |
| Rasmus Effersøe | xxx | | | | |
| Gullberg | | | | | x |
| Edna | x | | | xxx | x |

# Línuskip

Á talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu raksturin samanlagt hevur verið fyri línuskipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 22 | 19 | 16 | 17 | 16 | | |
| Nettosøla | 213.970 | 135.246 | 178.701 | 181.194 | 177.888 | *-16,9%* | *-1,8%* |
| Annar kostnaður | -105.886 | -76.242 | -88.333 | -82.960 | -95.454 | *-9,9%* | *15,1%* |
| **Bruttovinningur** | **108.084** | **59.004** | **90.368** | **98.234** | **82.434** | *-23,7%* | *-16,1%* |
| Starvsfólkakostnaður | -104.399 | -56.170 | -78.954 | -84.581 | -85.108 | *-18,5%* | *0,6%* |
| **Úrslit áðr. avskr. og rentur** | **3.685** | **2.834** | **11.414** | **13.653** | **-2.674** | *-172,6%* | *-119,6%* |
| Avskrivingar | -30.233 | -12.151 | -11.235 | -11.923 | -11.271 | *-62,7%* | *-5,5%* |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **-26.548** | **-9.317** | **179** | **1.730** | **-13.945** | *-47,5%* | *-906,1%* |
| Úrslit atknýtt felag | -2.895 | -248 | -257 | 656 | 31 | *-101,1%* | *-95,3%* |
| Niðurskr. av partabrøvum | 0 | -197 | 7 | 0 | 0 | - | - |
| Fíggjarinntøkur | 2.463 | 12.321 | 156 | 92 | 24.214 | *883,1%* | *26219,6%* |
| Fíggjarkostnaður | -26.850 | -13.992 | -8.755 | -14.703 | -9.864 | *-63,3%* | *-32,9%* |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **-53.830** | **-11.433** | **-8.670** | **-12.225** | **436** | ***-100,8%*** | ***-103,6%*** |
| Óvanligar inntøkur | 3.965 | 482 | 407 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Óvanligur kostnaður | -2.639 | 0 | 0 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-52.504** | **-10.951** | **-8.263** | **-12.225** | **436** | ***-100,8%*** | ***-103,6%*** |
| Skattur av ársúrsliti | 5.593 | 2.167 | 2.424 | 875 | -1.229 | *-122,0%* | *-240,5%* |
| **Ársúrslit** | **-46.911** | **-8.784** | **-5.839** | **-11.350** | **-793** | ***-98,3%*** | ***-93,0%*** |
| Tons íalt | 15.034 | 13.214 | 15.119 | 14.275 | 14.294 | *-4,9%* | *0,1%* |
| Miðalprísur | 14,23 | 10,24 | 11,82 | 12,69 | 12,44 | *-12,6%* | *-2,0%* |
| Dagar á fiskileið (mynstring) | 4.924 | 4.292 | 3.928 | 3.928 | 3.753 | *-23,8%* | *-4,5%* |
| Søla pr. dag (tkr.) | 43 | 32 | 45 | 46 | 47 | *9,1%* | *2,8%* |
| Ársverk | 292 | 256 | 221 | 235 | 220 | *-24,7%* | *-6,1%* |

Talið av skipum í hesum bólkinum er lækkað úr 22 skipum í 2008 til 16 skip í 2010. Síðani 2010 hava 16 – 17 skip verið í bólkinum. Veiðuvirðið í bólkinum og pr. skip lækkaði munandi frá 2008 til 2009. Síðani 2010 hevur veiðuvirðið verið á sama stigi.

Hesin bólkurin hevur havt tað trupult nógv tey seinastu árini. Samlað hevur hesin bólkurin ikki havt yvirskot síðani 2003. Henda gongd hevur hildið fram í tíðarskeiðnum 2008 – 2012. Vánaligasta ársúrslitið var í 2008, meðan ársúrslitið er frægast í 2012. Orsøkin til frægara ársúrslitið í 2012 er tó ikki úrslit av primera rakstrinum (EBITA var negativt í 2012), men positivum úrsliti av fíggjarpostum, hetta orsakað av umlegging/eftirgeving av skuld.

Við undantaki 2010 – 2011 hevur úrslitið av primerum rakstri verið negativt. Í 2012 er úrslit áðrenn rentur og avskrivingar negativt.

Annar kostnaður hevur ligið millum 49,2% og 56,3% av samlaðu søluni. Hægst í 2009 og lægst í 2010. Starvsfólkakostnaðurin hevur ligið millum 41,5% og 48,5% av samlaðu søluni. Hægst í 2008 og lægst í 2009.

Miðalaldurin hjá hesum skipabólki er 42 ár.

## Aktiv

Á talvuni niðanfyri eru aktiv í alt fyri línuskipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 22 | 19 | 16 | 17 | 16 | | |
| Goodwill / veiðiloyvi | 14.602 | 11.763 | 15.775 | 17.381 | 14.649 | *0,3%* | *-15,7%* |
| Skip | 257.446 | 213.604 | 188.464 | 187.024 | 148.692 | *-42,2%* | *-20,5%* |
| Bygningar | 357 | 235 | 655 | 5.165 | 4.000 | *1020,4%* | *-22,6%* |
| Rakstrartól og innbúgv | 848 | 206 | 124 | 104 | 75 | *-91,2%* | *-27,9%* |
| Framgoldin kostn. nýbygn. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Annað | 55 | 51 | 0 | 42 | 37 | *-32,7%* | *-11,9%* |
| **Materiell støðisogn íalt** | **258.706** | **214.096** | **189.243** | **192.335** | **152.804** | ***-40,9%*** | ***-20,6%*** |
| Kapitalpartar v.m. | 8.917 | 4.810 | 4.643 | 5.298 | 16.854 | *89,0%* | *218,1%* |
| Onnur virðisbrøv | 849 | 487 | 450 | 1.211 | 677 | *-20,3%* | *-44,1%* |
| Egin partabrøv | 211 | 211 | 211 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Onnur áogn | 405 | 355 | 613 | 245 | 90 | *-77,8%* | *-63,3%* |
| **Fíggjarlig støðisogn íalt** | **10.382** | **5.863** | **5.917** | **6.754** | **17.621** | ***69,7%*** | ***160,9%*** |
| **STØÐISOGN ÍALT** | **283.690** | **231.722** | **210.935** | **216.470** | **185.074** | ***-34,8%*** | ***-14,5%*** |
| Vørugoymsla umborð | 4.214 | 3.984 | 4.561 | 4.800 | 3.669 | *-12,9%* | *-23,6%* |
| Vøru- og tænastuáogn | 2.369 | 2.333 | 3.709 | 1.456 | 3.212 | *35,6%* | *120,6%* |
| Áogn atknýtt feløg | 31.255 | 38.426 | 37.704 | 36.025 | 65.479 | *109,5%* | *81,8%* |
| Útsett skattaogn | 28 | 956 | 1.566 | 1.688 | 1.426 | *4992,9%* | -15,5% |
| Onnur virðisbrøv | 2.806 | 2.806 | 346 | 25 | 26 | *-99,1%* | *4,0%* |
| Onnur áogn | 2.805 | 5.912 | 1.981 | 10.032 | 1.841 | *-34,4%* | *-81,6%* |
| **Áogn íalt** | **43.477** | **54.417** | **49.867** | **54.026** | **75.653** | ***74,0%*** | ***40,0%*** |
| Tøkur peningur | 10.224 | 8.868 | 8.881 | 12.848 | 15.982 | *56,3%* | *24,4%* |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | **53.701** | **63.285** | **58.748** | **66.874** | **91.635** | ***70,6%*** | ***37,0%*** |
| **AKTIV ÍALT** | **337.391** | **295.007** | **269.683** | **283.344** | **276.709** | ***-18,0%*** | ***-2,3%*** |

Virðið á skipum er fallið við 42,2% frá 2008, samstundis er talið av skipum fallið við 27,%. Virðið á goodwill/veiðuloyvum er óbroytt síðani 2008. Áognin er økt við 74% í tíðarskeiðnum.

Hesi viðurskiftini hava við sær, at samlaðu aktivini eru fallin við 18% síðani 2008.

## Passiv

Á talvuni niðanfyri eru passiv í alt fyri línuskipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 22 | 19 | 16 | 17 | 16 | | |
| | | | | | | | |
| Partapeningur | 28.683 | 21.126 | 15.842 | 16.043 | 23.208 | *-19,1%* | *44,7%* |
| Uppskrivingargrunnur | 42.154 | 41.749 | 35.379 | 33.167 | 3.055 | *-92,8%* | *-90,8%* |
| Tiltakspeningur | 8.971 | 3.986 | 3.729 | 4.173 | 4.205 | *-53,1%* | *0,8%* |
| Yvirkursur við emisión | 0 | 0 | 1.156 | 3.531 | 3.531 | - | *0,0%* |
| Aðrar burturleggingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 10.528 | - | - |
| Fluttur vinningur | -27.349 | -25.936 | -16.013 | -32.463 | -19.587 | *-28,4%* | *-39,7%* |
| **EGINOGN ÍALT** | **52.459** | **40.925** | **40.093** | **24.451** | **24.940** | ***-52,5%*** | ***2,0%*** |
| | | | | | | | |
| Útsettur skattur | 19.015 | 15.366 | 11.474 | 20.680 | 21.698 | *14,1%* | *4,9%* |
| Aðrar avsetingar | 596 | 507 | 518 | 790 | 859 | *44,1%* | *8,7%* |
| **AVSETINGAR ÍALT** | **19.611** | **15.873** | **11.992** | **21.470** | **22.557** | ***15,0%*** | ***5,1%*** |
| | | | | | | | |
| Langfreistað skuld | 182.933 | 181.272 | 164.403 | 178.838 | 136.731 | *-25,3%* | *-23,5%* |
| | | | | | | | |
| Avdráttir at gjalda næsta ár | 30.664 | 8.133 | 4.744 | 8.997 | 15.767 | *-48,6%* | *75,2%* |
| Bankaskuld | 4.305 | 4.877 | 2.575 | 2.446 | 2.000 | *-53,5%* | *-18,2%* |
| Ábyrgdarpeningur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Skuld til atknýtt feløg | 20.631 | 17.885 | 25.387 | 17.289 | 57.490 | *178,7%* | *232,5%* |
| Partafelagsskattur | 644 | 510 | 78 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Vøru- og tænastuskuld | 19.697 | 14.900 | 15.173 | 13.765 | 9.819 | *-50,1%* | *-28,7%* |
| Vinningsbýti | 50 | 4.537 | 0 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Vinningsbýtisskattur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Onnur skuld | 6.397 | 6.095 | 5.238 | 16.088 | 7.405 | *15,8%* | *-54,0%* |
| **SKULD Í ALT** | **265.321** | **238.209** | **217.598** | **237.423** | **229.212** | ***-13,6%*** | ***-3,5%*** |
| | | | | | | | |
| **PASSIV ÍALT** | **337.391** | **295.007** | **269.683** | **283.344** | **276.709** | ***-18,0%*** | ***-2,3%*** |

Eginognin er fallin við 52,5% síðani 2008, orsøkin til hetta er vánaligu úrslitini seinasta 5 ára skeiðið. Í sama tíðarskeiðið er langfreistaða skuldin lækkað við 25,3%. Samlaða skuldin er fallin við 13,6%.

Millumverandi við atknýtt feløg, bæði ogn og skuld, eru nógv økt síðani 2008.

| Analysa: | 2008 | | 2009 | | 2010 | | 2011 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Rentabilitetur* | | | | | | | | | | |
| Dekningsstig | 51% | | 44% | | 51% | | 54% | | 46% | |
| Ognaravkast | -8% | | -3% | | 0% | | 1% | | -5% | |
| Rakstraravkast | -22% | | -6% | | -3% | | -6% | | 0% | |
| Renting av eginogn | -89% | | -21% | | -15% | | -46% | | -3% | |
| Miðal renta fremmand skuld | 12% | | 7% | | 5% | | 7% | | 6% | |
| Miðal søluprísur | 14,23 | | 10,24 | | 11,82 | | 12,69 | | 12,44 | |
| Søla pr. dag til fiskiskap (kr.) | 43.455 | | 31.511 | | 45.494 | | 46.129 | | 47.399 | |
| *Gjaldføri* | | | | | | | | | | |
| Gjaldførisstig 1 | 0,60 | | 1,04 | | 1,02 | | 1,06 | | 0,95 | |
| Gjaldførisstig 2 | 0,65 | | 1,11 | | 1,10 | | 1,14 | | 0,99 | |
| *Soliditetur* | | | | | | | | | | |
| Soliditetsstig | 16% | | 14% | | 15% | | 9% | | 9% | |
| Gearing | 415% | | 475% | | 428% | | 778% | | 619% | |
| Søla | 213.970 | 100% | 135.246 | 100% | 178.701 | 100% | 181.194 | 100% | 177.888 | 100% |
| Annar kostnaður, óvanligt og skattur | 98.967 | 46% | 73.593 | 54% | 85.502 | 48% | 82.085 | 45% | 96.683 | 54% |
| Lønir | 104.399 | 49% | 56.170 | 42% | 78.954 | 44% | 84.581 | 47% | 85.108 | 48% |
| Renting og avskrivning | 57.515 | 27% | 14.267 | 11% | 20.084 | 11% | 25.878 | 14% | -3.110 | -2% |
| Úrslit | -46.911 | -22% | -8.784 | -6% | -5.839 | -3% | -11.350 | -6% | -793 | 0% |

Við undantaki av 2010 og 2011 hevur ognaravkastið verið negativt. Renting av eginogn er negativ øll árini. Gjaldførið hevur, við undantaki av 2008, ligið á nøkulunda sama stigi.

Soliditeturin er lækkaður í tíðarskeiðnum og er við árslok bert 9%, sum er alt ov lágt.

**Niðurstøða**

Línuskipini hava framhaldandi havt nøkur vánalig ár. Skipatalið er minkað úr 22 til 16 frá 2008 til 2012. Vánaliga gongdin hevur havt við sær, at soliditeturin er fallin, og er við árslok 2012 bert 9%. Veiðuvirðið pr. dag fall frá 2008 til 2009, fyri at hækka nakað aftur frá 2009 til 2010. Síðani 2010 hevur veiðuvirðið verið støðugt, men tó ov lágt. Flotin er gamal og í nógvar mátar ótíðarhóskandi. Verandi gongd kann tískil ikki halda fram. Væntast má tískil, at skipatalið fer at lækka, um viðurskiftini hjá hesum bólkinum ikki broytist.

**Útlit fyri 2013**

Línuskipini hava sum kunnugt havt møguleika at royna eftir toski á Flemish Cap og hevur hesin fiskiskapur í 2013 roynst væl. Prísurin hevur tó verið lágur og hevur tískil avmarka íkasti til raksturin. Ábendingar eru um, at fiskiskapurin undir Føroyum roynist betri enn undanfarin ár. Íslandskvotan er á sama støðið sum árini frammanundan. Tað er tískil okkara meting, at úrslitið fyri 2013 verður frægari enn í 2012, men tó ikki nøktandi.

**Yvirlit yvir skip**
Á talvuni niðanfyri eru tey skip, sum eru við í hesum skipabólki. Tey ár, har skip eru skift út ella hava skift eigara sambært Skipalistanum, eru merkt við 3 x'um (xxx).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Grani | x | | | | |
| Sigmund | x | x | x | x | x |
| Thomas Nygaard | x | xxx | x | x | x |
| Strandingur/Vesturhavið | x | x | x | x | x |
| Fugltúgvan/Sandshavið | x | x | | x | x |
| Venus | x | x | x | x | x |
| Kambur | x | x | x | x | x |
| Mascot | x | x | x | x | xxx |
| Stapin | x | | x | xxx | x |
| Helena | x | x | | | |
| Polarstjørnan | x | x | x | xxx | x |
| Morgunstjørnan | x | x | x | x | xxx |
| Núpur/Havbúgvin | xxx | x | x | x | x |
| Kvikk | x | x | x | x | x |
| Klakkur | x | x | x | x | x |
| Eysturoyingur | x | x | | | |
| Jákup B. | x | x | x | x | x |
| Hoyvíkingur | x | x | x | x | |
| Ågot | x | x | x | | |
| Váðasteinur | x | x | x | x | x |
| West Freezer | x | | | | |
| Eystnes | x | x | | | |
| Reynsatindur | | | | x | x |

# Garnaskip

Á talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu raksturin samanlagt hevur verið fyri garnaskipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 7 | 6 | 6 | 4 | 4 | | |
| Nettosøla | 45.299 | 37.030 | 35.397 | 29.860 | 15.883 | *-64,9%* | *-46,8%* |
| Aðrar inntøkur | 474 | 227 | 0 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Annar kostnaður | -23.951 | -20.190 | -16.257 | -13.944 | -3.982 | *-83,4%* | *-71,4%* |
| **Bruttovinningur** | **21.822** | **17.067** | **19.140** | **15.916** | **11.901** | ***-45,5%*** | ***-25,2%*** |
| Starvsfólkakostnaður | -24.171 | -19.495 | -17.890 | -13.902 | -11.361 | *-53,0%* | *-18,3%* |
| **Úrslit áðr. avskr. og rentur** | **-2.349** | **-2.428** | **1.250** | **2.014** | **540** | ***-123,0%*** | ***-73,2%*** |
| Avskrivingar | -4.014 | -4.358 | -3.717 | -1.406 | -877 | *-78,2%* | *-37,6%* |
| **Úrslit av primerum rakstri** | **-6.363** | **-6.786** | **-2.467** | **608** | **-337** | ***-94,7%*** | ***-155,4%*** |
| Úrslit atknýtt felag | 173 | 10 | 38 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Fíggjarinntøkur | 555 | 336 | 192 | 150 | 33 | *-94,1%* | *-78,0%* |
| Fíggjarkostnaður | -2.398 | -1.864 | -1.911 | -1.249 | -4 | *-99,8%* | *-99,7%* |
| **Úrslit áðrenn óvanligt** | **-8.033** | **-8.304** | **-4.148** | **-491** | **-308** | ***-96,2%*** | ***-37,3%*** |
| Óvanligar inntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Óvanligur kostnaður | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-8.033** | **-8.304** | **-4.148** | **-491** | **-308** | ***-96,2%*** | ***-37,3%*** |
| Skattur av ársúrsliti | 589 | 648 | 353 | 95 | -131 | *-122,2%* | *-237,9%* |
| **Ársúrslit** | **-7.444** | **-7.656** | **-3.795** | **-396** | **-439** | ***-94,1%*** | ***10,9%*** |
| Tons íalt | 2.167 | 1.641 | 1.287 | 948 | 587 | *-72,9%* | *-38,1%* |
| Miðalprísur | 20,90 | 22,57 | 27,50 | 31,50 | 27,06 | *29,4%* | *-14,1%* |
| Dagar á fiskileið (mynstring) | 1.487 | 1.379 | 961 | 747 | 341 | *-77,1%* | *-54,4%* |
| Søla pr. dag (tkr.) | 30 | 27 | 37 | 40 | 47 | *52,9%* | *16,5%* |
| Ársverk | 66 | 58 | 56 | 39 | 40 | *-39,7%* | *2,1%* |

Talan hevur verið um eina munandi minking í nettosøluni frá 2008 til 2012. Orsøkin til hetta er eitt stórt fall í veiðunøgdini, meðan meðalprísurin hevur sveiggjað nakað. Nøgdin er minkað við 72,9% frá 2008 til 2012, meðan miðalprísurin er hækkaður við 29,4%.

Talið av skipum er lækkað í tíðarskeiðnum. Væntast kann, at talið kemur at lækka enn meira soleiðis, at skipatalið í bólkinum kemur at verða 2 – 3 skip frameftir.

Miðalaldurin hjá hesum skipabólki er 48 ár.

## Aktiv

Á talvuni niðanfyri eru aktiv í alt fyri garnaskipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 7 | 6 | 6 | 4 | 4 | | |
| Goodwill / veiðiloyvi | 1.279 | 1.324 | 800 | 1.900 | 2.514 | *96,6%* | *32,3%* |
| Skip | 60.984 | 46.773 | 40.688 | 41.335 | 21.926 | *-64,0%* | *-47,0%* |
| Bygningar | 2.671 | 2.707 | 2.199 | 649 | 649 | *-75,7%* | *0,0%* |
| Rakstrartól og innbúgv | 232 | 257 | 148 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| **Materiell støðisogn íalt** | **63.887** | **49.737** | **43.035** | **41.984** | **22.575** | ***-64,7%*** | ***-46,2%*** |
| Kapitalpartar v.m. | 712 | 795 | 833 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Onnur virðisbrøv | 459 | 560 | 84 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| **Fíggjarlig støðisogn íalt** | **1.171** | **1.355** | **917** | **0** | **0** | ***-100,0%*** | **-** |
| **STØÐISOGN ÍALT** | **66.337** | **52.416** | **44.752** | **43.884** | **25.089** | ***-62,2%*** | ***-42,8%*** |
| Vørugoymsla umborð | 1.425 | 1.863 | 1.959 | 50 | 177 | *-87,6%* | *254,0%* |
| Vøru- og tænastuáogn | 1.229 | 4.007 | 1.005 | 363 | 8 | *-99,3%* | *-97,8%* |
| Áogn atknýtt feløg | 163 | 171 | 711 | 0 | 0 | *-100,0%* | - |
| Onnur áogn | 1.539 | 657 | 160 | 189 | 4.684 | *204,4%* | *2378,3%* |
| **Áogn íalt** | **4.356** | **6.698** | **3.967** | **602** | **4.869** | ***11,8%*** | ***708,8%*** |
| Tøkur peningur | 12.656 | 11.002 | 9.532 | 3.008 | 2.790 | *-78,0%* | *-7,2%* |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | **17.012** | **17.700** | **13.499** | **3.610** | **7.659** | ***-55,0%*** | ***112,2%*** |
| **AKTIV ÍALT** | **83.349** | **70.116** | **58.251** | **47.494** | **32.748** | ***-60,7%*** | ***-31,0%*** |

Orsakað av lækkandi talinum av skipum í hesum bólkinum, eru skipavirðini lækkað 64% frá 2008 til 2012. Tøki peningurin er lækkaður við 78% hetta tíðarskeiðið.

Samlaði javnin er minkaður við 60,7% frá 2008 til 2012.

## Passiv

Á talvuni niðanfyri eru passiv í alt fyri garnaskipini frá 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 7 | 6 | 6 | 4 | 4 | | |
| | | | | | | | |
| Partapeningur | 9.189 | 12.598 | 12.612 | 3.315 | 817 | *-91,1%* | *-75,4%* |
| Uppskrivingargrunnur | 9.769 | 9.779 | 9.817 | 4.342 | 1.640 | *-83,2%* | *-62,2%* |
| Yvirkursur við emisión | 979 | 1.925 | 1.925 | 0 | 0 | *-100,0%* | *-* |
| Fluttur vinningur | 8.646 | -5.191 | -9.941 | 3.252 | 15.148 | *75,2%* | *-365,8%* |
| **EGINOGN ÍALT** | **28.583** | **19.111** | **14.413** | **10.909** | **17.605** | ***-38,4%*** | ***61,4%*** |
| | | | | | | | |
| Útsettur skattur | 2.429 | 1.829 | 1.593 | 72 | 203 | *-91,6%* | *181,9%* |
| Aðrar avsetingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | *-* | *-* |
| **AVSETINGAR ÍALT** | **2.429** | **1.829** | **1.593** | **72** | **203** | ***-91,6%*** | ***181,9%*** |
| | | | | | | | |
| Langfreistað skuld | 41.653 | 35.015 | 29.408 | 31.568 | 4.023 | *-90,3%* | *-87,3%* |
| | | | | | | | |
| Avdráttir at gjalda næsta ár | 2.154 | 3.821 | 3.774 | 939 | 1 | *-100,0%* | *-99,9%* |
| Bankaskuld | 961 | 1.684 | 2.374 | 0 | 0 | *-100,0%* | *-* |
| Ábyrgdarpeningur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | *-* | *-* |
| Skuld til atknýtt feløg | 2.666 | 3.035 | 2.901 | 1.626 | 0 | *-100,0%* | *-100,0%* |
| Partafelagsskattur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | *-* | *-* |
| Vøru- og tænastuskuld | 4.668 | 4.953 | 3.444 | 1.793 | 1.357 | *-70,9%* | *-24,3%* |
| Vinningsbýti | 205 | 222 | 105 | 105 | 0 | *-100,0%* | *-100,0%* |
| Vinningsbýtisskattur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | *-* | *-* |
| Onnur skuld | 30 | 446 | 239 | 482 | 9.559 | *31763,3%* | *1883,2%* |
| **SKULD Í ALT** | **52.337** | **49.176** | **42.245** | **36.513** | **14.940** | ***-71,5%*** | ***-59,1%*** |
| | | | | | | | |
| **PASSIV ÍALT** | **83.349** | **70.116** | **58.251** | **47.494** | **32.748** | ***-60,7%*** | ***-31,0%*** |

Langfreistaða skuldin er fallin við 90,3% frá 2008 til 2012. Samlaða skuldin er í sama tíðarskeiði fallin við 71,5%. Eginognin er fallin við 38,4% frá 2008 til 2012.

| **Analysa:** | **2008** | | **2009** | | **2010** | | **2011** | | **2012** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Rentabilitetur* | | | | | | | | | | |
| Dekningsstig | 48% | | 46% | | 54% | | 53% | | 75% | |
| Ognaravkast | -8% | | -10% | | -4% | | 1% | | -1% | |
| Rakstraravkast | -16% | | -21% | | -11% | | -1% | | -3% | |
| Renting av eginogn | -26% | | -40% | | -26% | | -4% | | -2% | |
| Miðal renta fremmand skuld | 5% | | 5% | | 5% | | 4% | | 0% | |
| Miðal søluprísur | 20,90 | | 22,57 | | 27,50 | | 31,50 | | 27,06 | |
| Søla pr. dag til fiskiskap (kr.) | 30.463 | | 26.853 | | 36.834 | | 39.973 | | 46.578 | |
| *Gjaldføri* | | | | | | | | | | |
| Gjaldførisstig 1 | 1,46 | | 1,12 | | 0,90 | | 0,72 | | 0,69 | |
| Gjaldførisstig 2 | 1,59 | | 1,25 | | 1,05 | | 0,73 | | 0,70 | |
| *Soliditetur* | | | | | | | | | | |
| Soliditetsstig | 34% | | 27% | | 25% | | 23% | | 54% | |
| Gearing | 157% | | 212% | | 247% | | 298% | | 23% | |
| Søla | 45.299 | 100% | 37.030 | 100% | 35.397 | 100% | 29.860 | 100% | 15.883 | 100% |
| Annar kostnaður, óvanligt og skattur | 22.888 | 51% | 19.315 | 52% | 15.904 | 45% | 13.849 | 46% | 4.113 | 26% |
| Lønir | 24.171 | 53% | 19.495 | 53% | 17.890 | 51% | 13.902 | 47% | 11.361 | 72% |
| Renting og avskrivning | 5.684 | 13% | 5.876 | 16% | 5.398 | 15% | 2.505 | 8% | 848 | 5% |
| Úrslit | -7.444 | -16% | -7.656 | -21% | -3.795 | -11% | -396 | -1% | -439 | -3% |

Ognaravkastið hevur við undantak av 2011 verið negativt. Renting av eginogn hevur verið negativ øll árini. Gjaldførið hevur eisini verið støðugt versnandi hesi árini. Soliditeturin er tó øktur í tíðarskeiðnum og er við árslok 2012 54%, sum má metast nøktandi.

### Niðurstøða

Talið av skipum í hesum bólkinum er frá 2008 til 2012 fallið úr 7 til 4. Raksturin hevur givið hall øll árini, tó hevur úrslitið verið frægari í 2011 og 2012 enn árini frammanundan. Gjaldførið hevur verið versnandi, men soliditeturin er batnaður og er nøktandi við árslok 2012.

### Útlit fyri 2013

Sambært tølum frá FF fyri fyrstu 6 mánaðirnar í 2013 er veiðinøgdin hækkað nakað samstundis sum prísurin er á leið tann sami sum í 2012. Væntandi verður úrslitið hjá hesum skipabólki eitt vet betri enn í 2012.

### Yvirlit yvir skip

Á talvuni niðanfyri eru tey skip, sum eru við í hesum skipabólki. Tey ár, har skip eru skift út ella hava skift eigara sambært Skipalistanum, eru merkt við 3 x'um (xxx).

| | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** |
|---|---|---|---|---|---|
| Drelnes | x | x | x | x | xxx |
| Thor | x | x | | x | x |
| Nim | x | x | x | | |
| Oknin | x | x | x | x | x |
| Vesturland | x | | x | x | x |
| Ågot | x | x | x | | |
| Anita | x | x | x | | |

# Definitiónir av lyklatølum

| | |
|---|---|
| Rentabilitetur | |
| Dekningsstig | Bruttovinningur / Nettosøla |
| Ognaravkast (*afkastningsgrad*) | Úrslit av primerum rakstri / aktiv í alt |
| Rakstraravkast (*overskudsgrad*) | Úrslit / nettosøla |
| Renting av eginogn | Úrslit aftaná rentur og skatt / eginogn |
| Miðal renta fremmand skuld | Rentuútreiðslur / rentuberandi skuld |
| | |
| Gjaldføri | |
| Gjaldførisstig 1 | Ogn í umferð tó ikki goymslur / stuttfreistað skuld |
| Gjaldførisstig 2 | Ogn í umferð / stuttfreistað skuld |
| | |
| Soliditetur | |
| Soliditetsstig | (Eginogn ultimo / aktiv í alt)*100 |
| Gearing | Rentuberandi skuld / Eginogn |